| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>26. januar 2023 | Blað nr.: 1<br><br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 26. januar 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 1/23 – 28/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang
Bogi Jacobsen
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 1/23 | 23/00263-1 | Ruth Vang farloyvi frá býráðnum | 4 |
| 2/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 5 |
| 3/23 | 20/04131-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina | 6 |
| 4/23 | 20/04132-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd | 8 |
| 5/23 | 20/04135-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina | 10 |
| 6/23 | 20/04145-1 | Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini | 12 |
| 7/23 | 21/00126-1 | Val av bygginevnd fyri nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 16 |
| 8/23 | 23/00223-1 | Hoyvík sum valstað | 17 |
| 9/23 | 23/00237-3 | Matr. nr. 159i, Nólsoy. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur. | 20 |
| 10/23 | 22/07297-2 | Stuðul til filmsframleiðslu í Tórshavnar kommunu | 22 |
| 11/23 | 23/00194-1 | Verkætlan fyribyrgjandi fakligt samstarv millum barnaverndartænastuna, SSP og dagstovna- og skúlaøkið | 25 |
| 12/23 | 21/00900-5 | KFUM: Íløgustuðul til umvælingar av bygningi | 28 |
| 13/23 | 21/04973-5 | Umsókn um stuðul at fáa kappróðrarneystið hjá KÍF liðugt | 30 |
| 14/23 | 22/00068-1 | Havnar Dart : Felagshølir í Skansastovu | 32 |
| 15/23 | 21/05240-4 | Umsókn um stuðul til útbygging av neysti | 34 |
| 16/23 | 23/00098-1 | Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m. | 36 |
| 17/23 | 21/03568-2 | Serflokkur til skúlan á Argjahamri | 38 |
| 18/23 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 41 |
| 19/23 | 19/00691-1 | Nýggj høli til rakstrarstovn við Oyggjarvegin matr. nr. 1230b | 51 |
| 20/23 | 22/01222-3 | Yvirtøku av vegi matr. 1345k | 55 |
| 21/23 | 22/03571-1 | Miðbýarkjarnan | 57 |
| 22/23 | 22/07295-1 | Miðbýarætlan – Býarlundin | 62 |
| 23/23 | 22/07300-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn | 65 |
| 24/23 | 22/05163-1 | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | 67 |

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| 25/23 | 23/00147-1 | Kunning/fráboðanir í 2023 til býráðið | 71 |
| 26/23 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 72 |
| 27/23 | 22/07223-1 | Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging | 81 |
| 28/23 | 22/07317-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur | 84 |

**Til viðgerðar**

## 1/23 Ruth Vang farloyvi frá býráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 1/23 | 23/00263-1 |

**Málslýsing**
Ruth Vang hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur, vegna starv sum landsstýriskvinna

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Súsanna Olsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

| | **Býráðsfundur**<br>26. januar 2023 | Blað nr.: 5<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 2/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 3/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 256/20 | 20/04131-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 3/23 | 20/04131-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 25 í kommunustýrisskipanini er ásett:

1. petti. Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.
2. petti. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir
2. Útstykkingar
3. Byggimál
4. Lendismál
5. Kirkjugarðar
6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald av øllum kommunalum bygningum og anleggum eftir ásettari mannagongd
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðarstykki.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

Býráðsfundur 26. januar 2023: Vald vóru:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

# 4/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 257/20 | 20/04132-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 4/23 | 20/04132-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært kommunustýrisskipanini § 24 er ásett:

Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri málsøki nevndarinnar, verða fylgdar.

2. petti. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Bussleiðin
2. Vatnveiting og vatngóðska
3. Kloakkir og yvirflatuvatn
4. Vegir og ferðslumál
5. Gøtuljós
6. Onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Kristianna Winther Poulsen |
| Kári Johansen | Annfinn Brekkstein |
| Bjørg Dam | Súna Mørk |
| Jákup Dam | Gunvør Balle |

| | |
|---|---|
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Kristianna Winther Poulsen |
| Kári Johansen | Annfinn Brekkstein |
| Bjørg Dam | Súna Mørk |
| Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |

# 5/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 259/20 | 20/04135-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 5/23 | 20/04135-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 28 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Dagstovnaøkið
2. Fólkaskúli
3. Forskúli
4. Frítíðarskúli
5. Ungdómsvirksemi
6. Námsfrøðiliga ráðgevingin
7. Kvøldskúli
8. Musikkskúli
9. Býarbókasavn
10. Býarsavn
11. Mentanarhøli
12. Stuðulsskipanir
13. Svimjihøll
14. Uttandura vallir, ítróttaranlegg og ítróttahallir
15. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>26. januar 2023 | Blað nr.: 11<br><br>Formansins merki: |

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| Ruth Vang | Gunvør Balle |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

Býráðsfundur 26. januar 2023: Vald vóru:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| Súsanna Olsen | Gunvør Balle |

## 6/23 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 23/21 | 20/04145-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 70/21 | 20/04145-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 6/23 | 20/04145-1 |

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Eysturskúlin**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |
| Annika Olsen | Gunvør Balle |

**Sankta Frans skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Skúlin á Argjahamri**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

**Hoyvíkar skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Gunvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kaldbaks skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Frískúlin í Havn**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

Býráðsfundur 25. februar 2021: Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Ruth Vang | Elsa Berg |

**Eysturskúlin**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Annika Olsen | Gunvør Balle |

**Sankta Frans skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Skúlin á Argjahamri**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Hoyvíkar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Kári Johansen |
| Gunnvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Kaldbaks skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kári Johansen | Bjørg Dam |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Frískúlin í Havn**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Súsanna Olsen | Elsa Berg |

**Eysturskúlin**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |

Súna Mørk | Bjørg Dam
Annika Olsen | Gunvør Balle

**Sankta Frans skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |

**Skúlin á Argjahamri**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |

**Hoyvíkar skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Kári Johansen |
| Gunnvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Kaldbaks skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kári Johansen | Bjørg Dam |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Fríksúlin í Havn**

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

## 7/23 Val av bygginevnd fyri nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 32/21 | 21/00126-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 7/23 | 21/00126-1 |

**Málslýsing:**
Í bygginevndini sita í dag:
Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Eyðfríð L. Jacobsen, Birita Wardum, Bergur R. Olsen og Eyðna Justinussen.
Verkætlanarleiðari: Unnie Justinussen

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum fyri Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Valdar vóru Kristianna Winther Poulsen og Súsanna Olsen**.**

# 8/23 Hoyvík sum valstað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 21/23 | 23/00223-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 8/23 | 23/00223-1 |

**Upprunin til málið**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur, hevur biðið um at fáa málið á skrá í fíggjarnevndini.

**Lýsing av málinum**
Í Tórshavnar kommunu eru sjey valstøð. Størsta valstað er í Havn, og á løgtingsvalinum 8. desember 2022 vóru vórðu skrásettir 13.482 borgarar við valrætti.

Eftir støðd (tal á borgarum við atkvøðurætti) eru hini valstøðini í kommununi hesi:

| **Valstað** | **Valrætt (8. desember 2022)** |
|---|---|
| Argir | 1.787 |
| Kollafjørður | 741 |
| Velbastaður | 240 |
| Nólsoy | 180 |
| Kaldbak | 176 |
| Hestur | 17 |

Hoyvík er ikki skipað sum sjálvstøðugt valstað sum er, og í november 2022 høvdu 3.284 fólk í Hoyvík valrætt. Hesi atkvøða í dag á valstaðnum í Havn, sum er í ítróttarhøllini á Hálsi.

Var Hoyvík skipað sum egið valstað høvdu teir 3.284 borgararnir atkvøtt har, og tá hevði talið á veljarum við valrætti á valstaðnum í Havn minkað úr umleið 13.482 niður í umleið 10.200.

Heimildin at skipa Hoyvík sum egið valstað í § 20 í løgtingslóg um val til Løgtingið, ið er soljóðandi:

**§ 20.** Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.
*Stk. 2.* Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum kommunustýrið ávísir**,** har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða.
*Stk. 3.* Kommunustýrið útvegar ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram, og annars soleiðis háttaðir, at ongin atkvøðuseðil kann verða tikin upp úr, uttan kassin verður latin upp.
*Stk. 4.* Í atkvøðuhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistarnar vera uppsligin. Somuleiðis skal vera uppsligin ein vegleiðing fyri veljararnar, sum skal innihalda tær greinir í hesi lóg, sum mest týdning hava fyri sjálvt valið.

Ásett er í § 21 í løgtingslóg um val til Løgtingið, at tað er landsstýrismaðurin, sum við kunngerð broytir valstøðini:

**§ 21.** Val fer fram á teimum valstøðum, sum tilskilað eru á viðhefta skjali til hesa lóg. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð broyta valstøðini. Onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar.

Eitt nýtt valstað krevur sostatt góðkenning frá landsstýrismanninum í lógar og innlendismálum.

Óvist er, hvønn týdning tað hevur á ferðslu- og atkvomuviðurskiftini í høllini á Hálsi í sambandi við løgtingsval, um Hoyvík verður skipað sum egið valstað, men staðfestast kann, at veljarafjøldin í prosentum hevði minkað umleið 25%, um teir 3.284 borgararnir í Hoyvík atkvøddu har og ikki í Høllini á Hálsi sum er.

Metingar eru ikki gjørdar av, um tað hevði kravt fleiri starvsfólk enn tey, sum í dag taka sær av valunum á valstaðnum í høllini á Hálsi, um Hoyvík skuldi verið skipað sum egið valstað.

Roknast kann tó við nakað av eyka kostnaði í mun til í dag, um eitt høli afturat skal skipast sum valstað og mannast við starvsfólkum at taka sær av sjálvum valinum og uppteljingini av atkvøðum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Fíggjarnevndin umrøður málið. Er undirtøka fyri at skipa Hoyvík sum egið valstað, verður mælt til at beina málið aftur í umsitingina við atliti til at fáa til vega góðkenning frá landsstýrismanninum til at Hoyvík verður skipað sum nýtt valstað.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Nevndin tekur undir við at skipa Hoyvík sum valstað og beinir málið í býráðið við tilmæli um at fáa til vega góðkenning frá landsstýrismanninum til, at Hoyvík verður skipað sum nýtt valstað.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 9/23 Matr. nr. 159i, Nólsoy. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 17/23 | 23/00237-3 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 9/23 | 23/00237-3 |

**Upprunin til málið.**
Eigari hevur í teldubrævi heitt á kommununa um at keypa grundstykkið aftur.

**Lýsing av málinum**

Óbygt grundstykki matr.nr. 159i, Nólsoy.
Vídd 505m2.
Grundstykkið er ógrivið.
Keypari hevur fingið grundstykkið við tillutan.
Skeytið er tinglýst 27.07.2020.

Sambært grein 4 í skeytinum framgongur millum annað.
Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læттar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6475 | L64010 | Útstykking í Nólsoy |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 165.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |
| | | |

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndini, at keypa grundstykkið innaftur fyri uppruna prís kr. 165,000,-

Verandi eigari ( seljarin ) rindar allar útreiðslur í samband við afturkeypið. Í hesum føri er talan um útreiðslur til tinglýsing sum eru 2.650,00 kr.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 10/23 Stuðul til filmsframleiðslu í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.01.2023 | 1/23 | 22/07297-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 19/23 | 22/07297-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 10/23 | 22/07297-2 |

**Upprunin til málið**

Tórshavnar býráð hevur samtykt at játta 1 mió.kr. til vinnuverkætlan, sum hevur til endamáls at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum fáast við filmsframleiðslu í høvuðsstaðnum.

**Lýsing av málinum**
Talan er um nýggja verkætlan, sum skal skipast í fastar karmar og mannagongdir.

Endamálið við at lata stuðul er at skapa betri umstøður hjá teimum, sum fáast við filmsvinnu í høvuðsstaðnum við tí fyri eyga at menna eina nýggja og týðandi vinnugrein, sum stendur í vøkstri í størsta parti av heiminum.

Umsóknarfreistin verður í januar soleiðis, at umsøkjarar hava møguleika at samskipa umsóknir millum land og kommunu. Hjá landinum verða umsóknir viðgjørdar 2 ferðir um árið – februar og september.

Ein bólkur, sum er samansettur av umboðum fyri Stjórnarskrivstovuna, Mentamáladeildina, Klippfisk og Hugskotið verður settur til at fyrireika, viðgera og gera tilmæli til játtan av stuðli.

Mett verður, at samansetingin av bólkinum tryggjar, at umsóknirnar verða viðgjørdar av fólki við hóskandi fakligum førleikum og innliti.

Tilmæli verður lagt fyri vinnunevndina til støðutakan. Fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um stuðul.

Umsøkjari fær boð, og stuðulin verður útgoldin sambært nærri ásettum reglum.

**Treytir**

Tað er umráðandi, at stuðul verður latin til verkætlanir, sum hava eina ávísa filmsliga dygd, og tey, sum luttaka í verkætlanini hava førleikar at gjøgnumføra verkætlanina.

Eisini skal stuðulin viðvirka til, at høvuðsstaðurin fær enn ein sýnisglugga út í heim við lýsingum o.l., og at fólki, sum býr í kommununi, fær ágóðan av livandi myndunum, sum eru við til at styrkja móðurmáli og mentanina.

Tað er umráðandi, at stuðul verður latin til verkætlanir, sum er viðkomandi og skapa virði fyri Tórshavnar kommunu, filmsumhvørvið og vinnulívið í høvuðsstaðnum

Hetta merkir, at nakrar av hesum treytum skulu vera loknar:
- Søgan, sum verður søgd, skal hava Tórshavnar kommunu sum miðdepil
    - Søgan/hendingin skal hava samband við ella skal skapa virði fyri Tórshavnar kommunu
    - Hendingar skulu fara fram í Tórshavnar kommunu

- Filmurin verður lutvíst tikin upp í Tórshavnar kommunu

    - Filmslið skal í tann mun tað ber til brúka útgerð og tænastur frá veitarum í Tórshavnar kommunu.

- Filmsfólk skulu verða úr Tórshavnar kommunu
    - Filmsleikarar úr Tórshavnar kommunu

- Tað skal síggjast, at Tórshavnar kommuna hevur stuðlað filminum
- Kann samframleiðast við land, aðrar kommunur og privatar fyritøkur í Føroyum og uttanlands.

Umsóknin skal innihalda fylgjandi:
- Verkætlanarlýsing
- Fíggjarlýsing
- Íverksetanarlýsing

**Stuðulsupphæddir.**

Samlaði karmurin er 1 mió.kr.

Tað er umráðandi, at stuðulsupphæddin, sum játtað verður, ger mun fyri, at verkætlanin kann gjøgnumførast.

Filmsvinnan er kostnaðartung, og verður ofta fíggjað av nógvum og ymiskum pørtum.

Tískil skulu atlit eisini takast til annan stuðul, sum verkætlanin fær tá umsóknin verður viðgjørd.

Stuðul verður latin til fylgjandi tættir í filmsframleiðslu:

Menning av hugskotum/handritum (200.000 kr.)
Filmsframleiðsla (700.000 kr.)
Útbreiðsla (100.000 kr.)

Menning av hugskotum og handritum
Stuðul til verkstovur og átøk, sum leggja dent á hugskots- og handritsmenning

Filmsframleiðsla
    Ymiskir pakkar t.d. 40.000 kr., 75.000 kr. og í mesta lagi 500.000 kr.

Útbreiðsla
“Ein pallur” har møguleiki er at vísa film/verkætlan sum hava fingið stuðul og okkurt slag av reseptión/event/happening rundanum.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Kommunan hevur aðrar stuðulsskipan til mynd- og filmslist.

Samlaða stuðulsupphæddin til mynd- og filmslist er 650.000 kr.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at vinnunevndin tekur undir við, at ein bólkur verður settur til at fyrireika, viðgera og gera tilmæli til umsóknir um stuðul til filmsframleiðslu í Tórshavnar kommunu.

**Vinnunevndin 12. januar 2023: Samtykt at taka undir við tilmælinum, býtið á upphæddum er vegleiðandi, og at eftirmeta skipanina um eitt ár. Samtykt er at heita á stuðulsmóttakarar, at framleiðslan er so atkomulig sum gjørligt, her verður eitt nú hugsað um undirtekstir. Málið beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.**

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023: Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## 11/23 Verkætlan fyribyrgjandi fakligt samstarv millum barnaverndartænastuna, SSP og dagstovna- og skúlaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.01.2023 | 4/23 | 23/00194-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 9/23 | 23/00194-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 11/23 | 23/00194-1 |

**Upprunin til málið**
Uppskot um verkætlan at styrkja og menna fyribyrgjandi fakliga samstarvið millum barnaverndartænastuna, herundir eisini SSP, og dagstovnaøkið og skúlaøkið við tí endamáli, at hond verður tikin um møguligan mistrivnað hjá børnum og ungum so tíðliga sum til ber.

Víst verður eisini til játtan kr. 500.000 á kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannaøkið, sum ætlaðar eru hesum endamáli.

**Lýsing av málinum**
Barnaverndartænastan virkar eftir lóg um barnavernd. Endamálið við lógini er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur.

Partur av uppgávuni, ikki bert hjá barnaverndartænastuni, men eisini á dagstovna- og skúlaøkinum, har børnini eru, er tann almenna fyribyrgingin viðvíkjandi mistrivnaði v.m. Partur av hesum er eisini kommunala SSP-virksemið og tað samstarvið, sum sosialráðgevararnir á barnaverndartænastuni higartil hava havt við dagstovnar og fólka- og frítíðarskúlar.

Avbjóðing hevur tó verið, at starvsfólkaliga orkan hjá barnaverndartænastuni til hesa fyribyrging hevur ikki verið nøktandi í mun at halda fyribyrgjandi arbeiðinum støðugt uppi, tí málsviðgerð av barnaverndarmálum av givnum orsøkum verður tikin framum.

Í sambandi við fyribyrgjandi arbeiðið sum hevur verið higartil, so hevur samstarvið við skúlarnir verið býtt út á ávísar sosialráðgevarar, sum hava ábyrgdina av at skipa fyri arbeiðsfundum á leið 6. hvørja viku. Á dagstovnaøkinum hevur verið miðað eftir at koma út einaferð um ársfjórðingin. Tað er ein jaligur hugburður hjá øllum at taka lut, men hesin leistur er ikki nøktandi. Flestu fakfólkini tørva eitt enn tættari tvørfakligt samstarv, har sparring um stúranir og ivamál eru møgulig at taka upp.

Hóast skerpaða fráboðanarskyldu, so er færri enn fimtahvør fráboðan frá dagstovni ella skúla, har børnini og tey ungu annars eru stóran part av degnum. Løgreglan einsamøll stendur fyri fleiri fráboðanum enn dagstovnar og skúlar tilsamans.

Barnaverndartænastan ynskir at koma í samband við børn/familjur so tíðliga sum gjørligt, tá stúran er fyri trivnaðinum og menningini hjá barni/ungum. Jú fyrr sett verður inn við fyribyrgjandi fyriskipanum, jú skjótari fær barnið og familjan røttu hjálpina, og fyriskipanin nýtist ikki at verða eins umfatandi.

Hetta verður gjørt við at styrkja fyribyrgjandi arbeiðið við tættari tvørfakligum samstarvi, og

ítøkiligt merkir hetta, at fakfólk læra at fáa skjótari eyga á mistrivna og vandatekin, sum eru til staðar, tá eitt barn ikki trívist ella er á veg í mistrivna. Tað er umráðandi at verða varug við tey viðurskifti fyri at kunna arbeiða fyribyrgjandi og læra av tí.

Tað er tí umráðandi hjá kommununi at styrkja um samstarvið við leiðslu og fakfólkini á dagstovnum og fólka-/frítíðarskúlum, sum henda verkætlan fevnir um. Verkætlanin er tí ein roynd at vísa, hvørja ávirkan beinleiðis raðfesting av starvsfólkaorkuni til almenna fyribyrging á dagstovna- og skúlaøkinum í fastari legu gevur at fáa tikið hond um mistrivnað o.a. hjá børnum og ungum so tíðliga sum gjørligt. Endamálið er sostatt bæði barnsins støða, styrkt fakligt samstarv, og at møgulig mál ikki vaksa seg stór bæði við menniskjansligum og fíggjarligum avleiðingum,.

Ymisk uppskot hava verið um líknandi fyribyrgjandi verkætlan áður, seinast í trivnaðarnevndini í fjør, sí mál 21/02162 viðgjørt á fundi 12. mai 2022.

**Verkætlanin**
Henda verkætlan í uppskoti er hugsað at verða nakað minni í vavi enn omanfyri nevnda, tó við flestu av somu málum.

Ætlanin er at seta uml. 1,5 ársverk av til verkætlanina. Umframt tær nevndu kr. 500.000, er ætlanin at brúka verandi normeringar til SSP og fyribyrging aftrat, so at verkætlanin kann røkka longur. Ætlanin er eisini, at teir sosialráðgevarar, sum settir verða til uppgávuna, hava hetta sum ávísan starvsbrot, so at fleiri eru um uppgávuna og sum kunnu sparra innanhýsis í toyminum.

Verkætlanin verður skipað út frá barnaverndartænastuni og í samstarvi við leiðslurnar á dagstovnaøkinum og skúlaøkinum.
Sosialráðgevararnir standa fyri verkligu uppgávunum á dagstovnunum, fólkaskúlunum og frítíðarskúlunum. Millum hesar uppgávur skulu sosialráðgevararnir styrkja tað fyribyrgjandi arbeiðið saman við leiðslum og starvsfólkum á staðnum, so at børn í dalandi trivnaði ella mistrivnaði stuðlast so tíðliga, sum til ber. Sosialráðgevararnir skulu hava samstarv við námsfrøðingar og lærarar/ starvsfólk, stuðla og veita ráð og vegleiðing.

**Eftirmetingar**
Verkætlanin skal ávegis eftirmetast við árslok 2023 og endaliga eftirmetast á heysti 2024. Partar av eftirmetingini er skráseting av virkseminum, afturboðanir frá leiðslum og starvsfólkum á dagstovna- og skúlaøkinum og barnaverndartænastuni sjálvari. Eftirmetingin verður løgd fyri trivnaðarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Barnaverndarlógin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| Sosialar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við uppskotinum um fyribyrgjandi verkætlan sum lýst omanfyri fyri árini 2023-2024, og í hesum sambandi:

- at játta kr. 500.000 av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál til rakstur av verkætlanini í inniverandi ári,
- at játta kr. 500.000 til endamálið í fíggjarætlanini 2024,
- at verandi normering til SSP og fyribyrging hjá barnaverndartænastuni (konta 2614) verður fevnd av verkætlanini, sum sostatt samlað fer at fevna um uml. 1,5 ársverk, og
- at verkætlanin verður eftirmett tvær ferð sum omanfyri lýst.

Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið.

**Trivnaðarnevndin 12. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## 12/23 KFUM: Íløgustuðul til umvælingar av bygningi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 58/22 | 21/00900-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 5/23 | 21/00900-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 1/23 | 21/00900-5 |
| 4 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 12/23 | 21/00900-5 |

**Upprunin til málið**
KFUM skótarnir hava søkt TK um stuðul til íløgur.

**Lýsing av málinum**
Bygningurin hjá KFUM skótunum á Hoydalsvegi skal klæðast. Felagsskapurin søkir um stuðul til hetta arbeiðið, og at TK t.d. stuðlar krónu fyri krónu, so KFUM megnar at lyfta hesa uppgávu. Søkt verður um stuðul til íløgur í hesa umvæling soleiðis, at TK betalir helvtina av íløguni, og KFUM sjálvt ber helvtina av útreiðslunum.

KFUM hevur fingið tilboð frá Articon uppá arbeiðið: Viðv.: Klæða húsini hjá KFUM
1. byggistig - tilboð upp á at bjálva, klæða og skifta vindeyguni á húsunum á Hoydalsvegi 6 í Tórshavn, samlað tilboð, ikki íroknað mvg: kr. 1.596.301,-

2. byggistig - tilboð upp á at bjálva, klæða, skifta vindeyguni og úthurðar, skifta og bjálva tekjuna á húsunum, samlað tilboð, ikki íroknað mvg: kr. 3.325.948,-

Samlaða upphæddin fyri umvælingina er sostatt kr. 4.922.249,- uttan mvg.

Sambært leiðreglunum fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, er stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum. Stuðulstilsøgn er harumframt m.a. treytað av, at játtan er tøk á fíggjarætlan kommununnar. Undantøk hava tó verið til hesa reglur, har TK hevur goldið upp til helvtina av líknandi íløgum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur

**Upplýsingar frá umsitingini**
KFUM fekk í 2020 kr. 50.000,- í stuðli til rakstur av húsinum, og hava søkt rakstrarstuðul fyri 2021.

Ongin tøk fígging er á kontu 5370 Stuðul til íløgur í 2022.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Tvær aðrar umsóknir eru um stuðul til íløgur, hesar eru frá fótbóltsfeløgunum HB og B36 at umvæla felagshúsini.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki at viðmerkja

**Skjøl**
Tilboð og veitingarlisti frá Articon eru hjáløgd, saman við roknskapi hjá KFUM.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at játta stuðul í 2022.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini.

**Ískoyti:**
Víst verður til umsóknina, sum viðgjørd varð í fjør, har søkt er um stuðul til ávís arbeiðir at dagføra KFUM-húsi. Kostnaðarmeting tá er beint undir kr. 5 mió u/mvg. Fíggjarstøðan á kontu 5370 stuðul til íløgur gav ikki rúm fyri at játta stuðul.

Skotið verður upp, at játta kr. 1,5 mió í stuðli til verkætlanina, sum er uml. 30% av kostnaðarmetingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mió av kontu 5370 Stuðul til íløgur til endamálið, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 13/23 Umsókn um stuðul at fáa kappróðrarneystið hjá KÍF liðugt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 103/22 | 21/04973-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 142/22 | 21/04973-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 1/23 | 21/04973-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 27/23 | 21/04973-5 |
| 5 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 13/23 | 21/04973-5 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um stuðul at fáa kappróðrarneystið hjá KÍF liðugt, dagfest 8. des. 2021.

**Lýsing av málinum**
Inn er komin umsókn frá KÍF um fíggjarligan stuðul til at fáa kappróðrarneystið liðugt.

Málið viðv. at fáa kappróðrarneystið liðugt er eisini viðgjørt í øðrum málið - mál 20/03315. Í sama málið fyriliggur ein 2 ára gomul kostnaðarmeting til liðugtgerð av neystinum. Men prísirnir eru farnir upp síðani, og kostnaðarmetingin í dag er á 800.000 kr.
Mál 20/03315 endar annars við, at kommunan veitur stuðul á 34.000 kr til at gera bátadráttin í stand.

KÍF skjýtur nú upp, at leisturin verður, at KÍF tekur lán uppá 650.000,- ið kommunan fíggjar, avdrag og rentur yvir 2 ár. Hinar 150.000,- klárar KÍF sjálvt.
Í fyrstu atløgu ynskir KÍF eina skriftliga tilsøgn frá kommununi, at hon rindar lánið aftur yvir tvey ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur um stuðul til íløgur.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongin upphædd er sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2022.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla frá at veita stuðul, tí ongin upphædd er sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2022.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til eykajáttan til kontu 5370 Stuðul til íløgur, mál 22/02292, ið fer til aðru viðgerð á næstkomandi býráðsfundi.

Sambært umsóknini er kostnaðarmetingin kr. 800.000. Við 30% stuðli er upphæddin kr. 240.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta KÍF kr. 240.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til umsóknina, sum viðgjørd varð í fjør, har søkt er um kr. 650.000 í stuðli til liðugtgerð av kappróðrarneystinum, samlað kostnaðarmetingin er uml. kr. 1,9 mió. Fíggjarstøðan á kontu 5370 stuðul til íløgur gav ikki rúm fyri at játtað upp til 30%.

Í 2022 er játtað kr. 240.000. Skotið verður upp, at játtaðar verða kr. 350.000 aftrat sum endaligur stuðul til verkætlanina, svarandi til uml. 30% av kostnaðarmetingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 350.000 av kontu 5370 Stuðul til íløgur til endamálið, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Nevndin samtykti eisini at biðja um endaliga uppgerð av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 14/23 Havnar Dart : Felagshølir í Skansastovu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 74/22 | 22/00068-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 72/22 | 22/00068-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 6/23 | 22/00068-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 3/23 | 22/00068-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 14/23 | 22/00068-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í mentamálanevndini 9. juni 2021 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020. Av tí at málið um skúlabygningar er viðgjørt so oftani í nevnd verður mett greiðari, um málið um Havnar dart nú verður viðgjørt í sjálvstøðunum og nýggjum máli.

9. juni 2021 samtykti mentamálanevndin at útvega byggiloyvi og at fara í samráðingar við Havnar dartfelag um umbyggingina at leggja aftur fyri nevndina, tá støðutakan til fígging eisini skal gerast.

**Lýsing av málinum**
Í heyst hevur umsitingin verið í dialogi við felagið og er málið eisini viðgjørt við byggimálsdeildina.

Niðurstøðan er at ein loysn kann gerast, ið er mett til umleið 450 tkr. (alt íroknað) og fevnir um arbeiðstøkur innan timbur og el og HVS, umframt at felagið sjálvt kemur at taka sær av at hjálpa til við niðurríving, umframt gólv- og málingaarbeiði v.m., men fáa tilfarið rindað av kommununi.

Eftir umstøðunum vera minst tvey undirhondsboð heintað inn til arbeiðstøkurnar innan timbur og el. Sí hjálagt skjal við metingum.

Mælt verður til at fíggja arbeiðið av projektkontu 73036 Fablab, har 350 tkr. eru tøkar.Tann ætlanin innan skúla- og mentanarøkið er ikki blivin til nakað og tí upphæddin tøk. Upphæddin røkkur ikki heilt, men er grundarlag fyri at byrja og so meta um støðuna so hvørt arbeiðir og arbeiðstøkur eru aktuellar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Meting.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 350 tkr. av projektkontu 73036 Fablab til at fremja umbyggingina í Skansastovu og at gera neyðugar avtalur v.m. í hesum sambandi.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at játta kr. 250.000 av kontu 5510 Tórshavnar býarsavn vísandi til minninýtslu á hesi kontu í 2021 til kontu 5717 Ítróttanlegg, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen tekur ikki undir við tilmælinum, og mælir til, at framflytingin verður verandi hjá Býarsavninum, og at játtanin til umbyggingina av Skansastovu verður funnin aðrastaðni.

**Ískoyti:**
Higartil hevur verið arbeitt við at taka niður verandi høli. Kostnaðarmetig at gera hølini liðug er uml. kr. 470.000 íroknað mvg, sí skjal.

Møguleiki er at fíggja hetta av løgukarmi LK5775 L57029 Smærri ítróttaanlegg, har kr. 1 mió er tøk at fíggja inn løgukontu 5775 L57029 Smærri ítróttaanlegg, har tað er ein meirnýtsla uppá kr. 502.000. Netto eru sostatt kr. 498.000 tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.000.000 at løgukarmi LK57029 Smærri ítróttaanlegg til løgukontu L57029, og at tøka upphæddin kr. 498.000 verður at gera hølini í Skansastovu ætlað Havnar Dartfelag liðug.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## 15/23 Umsókn um stuðul til útbygging av neysti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 73/22 | 21/05240-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 2/23 | 21/05240-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 2/23 | 21/05240-4 |
| 4 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 15/23 | 21/05240-4 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um stuðul frá Havnar Róðrarfelag

**Lýsing av málinum**
Havnar Róðrarfelag søkir um 1.188.000,- til útbygging av neystinum hjá felagnum.

Síðani 2008 er virksemið hjá felagnum er vaksið nógv, og hetta krevur at kamarnir vera víðkaðir.

Fyri at nøkta tørvin hjá felagnum, vera bátar leigaðir í løtuni leigaðir frá øðrum feløgum.

Seinastu áriini hevur felagið leigað bingjur fyri at húsa øllum bátunum meðan limirnir venja úti. Hetta er sera møtimikið fyri rógvarar og nevnd, tí bingjur eru trongligar og illa egnað til neyst, umframt at bátarnir fara illa. Teir mánaðirnir limirnir venja inni, manglar felagið eisini pláss til innanduravenjing. Pláss er heilt einfalt ikki til alt fólkið.

Nevndin í Havnar Róðrarfelag hevur fingið tilvega byggiloyvi frá Tórshavnar Kommunu. Nú H bygningurin er liðugur er grundstykkið gjørt byggibúgvi og klárt er at seta hol á sjálva byggingina. Nevndin hevur fingið tilvega kostnaðarmetingar og tilboð uppá arbeiðið at byggja.

Verkætlanin er ætlað at verða fíggjað á henda hátt

| Fígging | Upphædd | Lutfall |
|---|---|---|
| Eginfígging | 1.500.000,00 kr. | 42% |
| Tórshavnar kommuna | 1.188.000,00 kr. | 33% |
| TAKS (Mvg afturbering) | 720.000,00 kr | 20% |
| Stuðlar | 192.000,00 kr. | 5% |
| **Íalt** | **3.600.000,00 kr.** | **100%** |

Prísurin fyri hvønn fermetur er áleið 13.333,- ið er væl niðanfyri vanligan byggikostnað fyri líknandi bygnngar í skrivandi løtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 3. september 2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongin fígging er tøk á kontu 5370 Stuðul til íløgur – í 2022.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Árrokniskapur felagsins fyri 2020 er viðheftur.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ私ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at játta stuðul vegna vantandi tøka fígging á - kontu 5370 Stuðul til íløgur - í 2022.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini.

**Ískoyti:**
Víst verður til umsóknina, sum viðgjørd varð í fjør, har søkt er um kr. 1.188.000 í stuðli. Fíggjarstøðan á kontu 5370 stuðul til íløgur gav ikki rúm fyri at játta stuðul.

Skotið verður upp, at játta kr. 1 mió í stuðli til verkætlanina, sum er uml. 30% av kostnaðarmetingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1 mió av kontu 5370 Stuðul til íløgur til endamálið, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>26. januar 2023 | Blað nr.: 36<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 16/23 Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 19/23 | 23/00098-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 6/23 | 23/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 16/23 | 23/00098-1 |

**Upprunin til málið**
Nýggj ljós til vøllin inni í Vika, sbrt. krøvum frá FSF.

**Lýsing av málinum**
Sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF er kravið til stadion-ljós styrki uppá í minsta lagi 250 EV(lx). Kravið hevur verið galdandi í nøkur ár, og verandi ljósskipan lýkur ikki hesar treytirnar. Sostatt hevur leikvøllurin inni í Vika verið góðkendur upp á undantak seinastu árini. Verandi ljósskipan er heldur ikki nøktandi til vanligar venjingar.

Sbrt. mál 22/06615 (eykajáttan av meirinntøkum 2022) samtykti býráðið at seta kr. 3 mió. av til m.a. nýggja ljósskipan við vøllin inni í Vika.

Neyðugt er at gera ávísar kanningar av verandi mastrafundamentum og sjálvum mastrunum. Eisini skal kannast, hvør ljósskipan er best hóskandi fyri at uppfylla treytirnar í Vallareglugerðini hjá FSF, harafrtat skal hædd takast fyri ljósdálking. Royndirnar frá nýggju ljósskipanini á Ovara vølli verða eisini tiknar við.

Tíðarætlanin er, at øll ráðgeving viðv. mastrarfundamentum, mastrum og ljósskipan, harundir eisini møguliga atknýtt el-arbeiðir, er liðug um miðjan mars, so at útboð kunnu fara fram til várs, og at ljósskipanin er liðug at taka í nýtslu fram móti heystinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vallarreglugerð FSF

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ljósskipanin á Ovara vølli
Ljósskipanin til Tórsvøll

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57039 | Fótbóltsvallir | 5775 | L57043 | Ljósskipan inni á Vika | Ja | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at fáa til vega ráðgeving viðv. tekniskum installatiónum í sambandi við at fáa nýggja ljósskipan, og at umsitingin fær heimild til at bjóða út nýggja ljósskipan at leggja fyri nevnd til støðutakan.

Harumframt verður mælt til at játta kr. 3.000.000 av løgukarmi LK570390 til nýggja løgujáttan Ljósskipan inni á Vika. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 17/23 Serflokkur til skúlan á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 66/21 | 21/03568-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 44/22 | 21/03568-2 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.01.2023 | 2/23 | 21/03568-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 8/23 | 21/03568-2 |
| 5 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 17/23 | 21/03568-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Skúlanum á Argjahamri um høli til serflokk.

**Lýsing av málinum**
Skúlin á Argjahamri hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um heimild at stovna serflokk í skúlanum. Sambært § 8 í kunngerðini at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð skal serflokkur hava egin høli, sum skulu vera egnað til endamálið.

Skúlin vísir á, at hølini hjá tannlæknanum eru egnað til endamálið. Har kunnu vera tvær skúlastovur og eitt sansarúm, men hetta krevur, at tannlæknin flytur úr skúlanum. Í løtuni brúkar tannlæknin bert hølini til kanningar, ið verða gjørdar einaferð um vikuna. Heilsufrøðingurin nýtir tað eina høli í mai, men hon metir, at onnur loysn kann finnast á tí.

Ein leyslig meting er, at tað kostar 5000,- kr. at taka tannlæknaútgerðina niður. Kostnaðarmeting er ikki gjørd fyri útreiðslur til innbúgv, tilfar og tillaging av hølum.

Í skúlanum á Argjahamri eru 393 næmingar, tá er forskúlin taldur við. Nógv verður bygt á Argjum, so næmingatalið fer væntandi at hækka.

Nógvir flokkar í skúlanum eru á tremur, og skúlin metir, at næmingar við serligum tørvi fáa ikki tann frið og teir karmar, sum teimum nýtist.

Víst verður til ávegis uppritið um sernámsfrøiliga økið (18/04396-47). Á s. 6 í uppritinum verður gjørt vart við, at tørvur er á einum tilboðið aftrat í Tórshavnar kommunu til næmingar við autismu og menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, og at tað tilboðið kundi verið í Skúlanum á Argjahamri, men neyðugt er fyrst at finna eina hølisloysn har.

Skúlin vísir á tannlæknahølini, men kanska eru aðrir møguleikar eisini, t.d. í felagsøkjum ella í Látrinum. Um tað ber til at innrætta høli har, kundu tey verið brúkt til flokshøli ella til serhøli, so annað flokshøli ella serhøli, ið ikki er so árent, kann innrættast til serflokkin, og virksemið, sum hevur verið har frammanundan, kann so flyta í nýggju hølini í felagsøkinum ella í Látrinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 24 frá 19. mars 2019 um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Skjøl**
eingi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at umsitingin saman við skúlanum kannar, um tað ber til at finna aðrar góðar hølisloysnir til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til mál 18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum og samtykt í trivnaðarnevndini 10. februar 2022.

Umsitingin hevur fingið svar frá skúlaleiðslu og næmingaráðnum um møguligar avleiðingar av, at partur av Látrinum verður innrættað til serflokk.

Í skrivinum frá skúlastjóranum stendur m.a., at tá mann tekur part av Látrinum, minkar fermetratalið av spæliøkinum eisini. Harumframt verður eisini stórur partur av natúrliga ljósinum tikin. Í skrivnum stendur m.a. "Hóast spæliøkið minkar, eru 419 fermetrar eftir. Næmingaráðið í miðdeild hevur nógv góð hugskot til, hvussu vit kunnu fáa nógv burturúr økinum."

Skúlastjórin upplýsir, at hon hevur spurt um ljósviðurskiftini, og mett verður, at at Látrið fer at fáa ljós inn frá miðøkinum (partur av vegginum í Látrinum eru rútar, sum vísa inn í urðina í miðøkinum) Harumframt fáast ljós, sum loysa trupulleikan.

Í skrivinum frá næmingaráðnum í miðdeild stendur, at ráðið hevur verið í Látrinum og hevur har fingið frágreiðing um, hvørjar broytingar eru í væntu. Næmingaráðið heldur, at tað er eitt gott hugskot, tí tað er gott, at næmingar, ið ikki megna skúlan, fáa eitt tilboð í skúlanum, og Látrið verður framvegis nóg stórt til, at tað ber til at spæla ymisk spøl har í fríkorterunum.

Kostnaðarmeting fyri innbúgv og innrætting av hølum er hjáløgd. Uppskot til innrætting er hjálagt.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at umrøða ætlanina, harundir útvegan av løgujáttan til endamálið í fíggjarætlanini 2023.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við uppskotinum at skipa høli í Látrinum, og at taka málið um fígging upp í sambandi við fíggjarætlanina 2023.

**Ískoyti**
Í fíggjarætlanini 2023 eru kr.1,5 mió settar av til umbygging av Látrinum til serflokk. Játtanin er á 4175 Dagføring av skúlum LK41017, og biðið verður um, at upphæddin verður játtað inn á løgukontu.

Eftir at fíggjarætlanin er samtykt, hevur Skúlin á Argjahamri sambært § 45, stk. 7 fólkaskúlalógini søkt Barna- og útbúgvingarráðið um loyvi at seta á stovn sertilboð í skúlanum, tilboðið verður skipað sambært kunngerð nr. 24 frá 19. mars 2019 um serligan skúla ella undirvísingartilboð. Umsóknin er til viðgerðar og møgulig góðkenning frá ráðnum verður grundað á tilmæli frá Undirvísingarstýrinum og Sernámi. Serflokkur skal hava egin høli, sum eru egnað til endamálið.

Tekning av innrætting av hølum í Látrinum er hjáløgd, nr. 21/03568-13. Ætlanin er, at hølini eru liðug til skúlaársbyrjan í august í 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at umsitingin fær heimild at bjóða arbeiðið út og taka av tilboði innanfyri karmin
b) at játtaða upphæddin 1,5 mió. kr. á 4175 Dagføring av skúlum LK41017 verður flutt á løgukontu.

Málið verður umvegis fíggjarnevndina beint í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 12. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## 18/23 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |
| 27 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 151/18 | 14/05065-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 265/18 | 14/05065-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 355/18 | 14/05065-1 |
| 30 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 319/18 | 14/05065-1 |
| 31 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 23/19 | 14/05065-1 |
| 32 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 44/19 | 14/05065-1 |
| 33 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 38/19 | 14/05065-1 |
| 34 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 178/19 | 14/05065-1 |
| 35 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 320/19 | 14/05065-1 |
| 36 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 307/19 | 14/05065-1 |
| 37 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 255/21 | 14/05065-1 |
| 38 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 1/22 | 14/05065-1 |
| 39 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 14/22 | 14/05065-1 |
| 40 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 12/22 | 14/05065-1 |
| 41 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 8/23 | 14/05065-1 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 12/23 | 14/05065-1 |
| 43 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 18/23 | 14/05065-1 |

## Málslýsing:
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. Til miðbýarætlan og kr. 2 mió. Til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. Til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. Settar av til miðbýarætlan.

## Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr.   60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. Av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. Apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. Nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. Av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. November 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. Á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot – *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. Uttan mvg. At standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. Uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. Uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas

er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. Uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. Við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. Eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. Við mvg. Resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. Av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Eftir lisitatiónina hevur TG-Verk viðmerkt, at “tilboðið at gera býartorg í Steinatúni sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur er bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin, og TG Verk ikki hevur lovað at staðið við tilboðini”. Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum.

Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í kontakt við hægra tilboðsveitara, P/F Articon, sum hava váttað, at teir ikki megna at koma niður til prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum. Eftirfylgjandi hevur umsitingin verið í samráð við Sp/f Húsavarðartænastuna, P/F Nomatek og somuleiðis kannað møguleikar í Danmark, men eingin hevur verið áhugaður at gera hetta fyri prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum.

Umsitingin hevur bíðað eftir at bjóða verkætlanina út av nýggjum, tí tilboðini vórðu formelt annulleraði fríggjadagin 24.08.2018. Tískil skal mann smb. ABF06 bíða í 3 mánaðir frá hesum dato, áðrenn møguleiki er at bjóða hetta út av nýggjum, t.e. í fyrsta lagi 24.11.2018.

Fyri at fáa býartorgið í Steinatúni gjørt, so er ætlanin at bjóða somu verkætlan út enn einaferð í innbodna lisitatión til hesar arbeiðstakarar:

Sp/f Búsetur
Sp/f ÁTS
Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f Norðhús
P/F Articon
P/F MT/Højgaard

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera verkætlanina býartorg í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini, j.nr. 14/05065-77. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið á býartorg í Steinatúni út aftur eftir omanfyristandandi leisti, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Hálvtak á býartorginum Steinatún:**
Lisitatión var fyri verkætlanina Býartorg í Steinatúni tann 25. januar 2019. Bara ein arbeiðstakari møtti upp, og tað var Sp/f Húsavarðartænastan. Teirra tilboð var áljóðandi: 3.097.245,37 kr. Uttan mvg.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi 3.998.986,00 at gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

2,4 mió. Eru longu játtaðar til verkætlanina Býartorg í Steinatúni. Sostatt manglar 1,6 mió. At gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt.

**Dagføring av flísaálegging:**
Í sambandi við lokaðu verkætlanina at leggja flísar á torgið í Steinatúni, sum ikki vísir seg at vera nøktandi í mun til val av tilfari og onnur viðurskifti, er ynski lagt fram um at bøta um torgið og teir manglar, ið eru á staðnum. Talan er um brotnaðar flísar, ójavna yvirflatu, kantar millum torg og koyribreyt, trappu við ov lágum trapputrinum og vantandi gongulinjur til sjónveik.

Zeta Architects hava gjørt uppskot til eina uppstigan av torginum í Steinatúni, sum tekur atlit til leiðlinjur fyri sjónveik, atgongd fyri rørslutarnað, gliðtrygga yvirflatu, tunga ferðslu og stødd á flísum. Størri krøv eru somuleiðis sett til nýggjar flísar. Steinatún er ein liður í eini størri heild, og hava Zeta Architects somuleiðis gjørt uppskot við somu treytum til nýggja flísaálegging á gongugøtuni, frá Steinatúni og oman til Vaglið, sí uppskotið "Gongugøtan". Fyri at skapa eina betri og samanhangandi heildarmynd av miðbýnum tørvar gongugøtan somuleiðis eina uppstigan, og ber hon bráð av nógvum sløgum av flísum, brotnaðum flísum og einum sundurskildum býarrúmi.

Umsitingin mælir til at arbeiða víðari við uppskotinum "Gongugøtan", har neyðugar tillagingar verða gjørdar, umframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri ráðgeving, prosjektering og arbeiðstøku av uppskotinum.

**Skjøl:**
Gongugøtan, journal nr. 14/05065-83.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

1. At taka av tilboðnum fyri býartorgið, fara í sáttmálasamráðingar og undirskriva arbeiðstakarasáttmála við Sp/f Húsavarðartænastuna og játta írestandi pening áljóðandi 1 mió. Kr. Av konto 6275, L62034 Vágsbotnur – skipan av økinum og 600.000 kr. Av L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62029 Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýli og norðara síðan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
2. At umsitingin arbeiðir víðari við uppskotinum at uppstiga torgið, at játta kr. 200.000 til ráðgeving av konto 6275, L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62027 Miðbýarætlan – Steinatún, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið í sambandi við verkætlanina L62027 Miðbýarætlan – Steinatún, sum fevndi um uppfylling og flísalegging eystarumegin vegøkið, gekk væl og var handað kommununi til ásetta tíð, tann 30. november 2016, við einum avlopi á kr. 42.805,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At loka verkætlanina L62027 Miðbýarætlan – Steinatún.
2. At avlopið á kr. 42.805,- verður flutt til løgukarmin L00001 á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur) 2019.
24. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ìskoyti:**
Verkætlanin Steinatún Býartorg hevur havt stórar avbjóðingar frá byrjan av. Verkætlanin er lítil í vavi, men sjálv konstruktiónin er óroynd og eindømi í Føroyum. Fyrsta avbjóðing var, at stálarbeiðið mátti broytast og tillagast. Frá byrjan varð prosjektið hugsað sum ein samlað konstruktión, sum kundi verið bygt á einum stað og síðani transporterað oman á Steinatún í einum. Skjótt blivu fortreytirnar broyttar, tí hetta ikki bar til m.a. orsakað av tilfarsvalinum á m.a. koparinum sum yvirflatu. Kopar tolir ikki væl at verða útsett undir transport. Onnur avbjóðing hevur verið viðv. Kopararbeiðinum, at undirarbeiðstakari hjá HVT hoppaði frá, tí viðkomandi metti hetta arbeiðið vera ov trupult at gera. Hesi átøk hava seinkað verkætlanini munandi.

Umsitingin hjá TK hevur varslað dagbøtur á verkætlanina mótvegis arbeiðstakaranum HVT. Í lýsingini av málinum hevur HVT aksepterað dagbøtur í fyrsta lagi. Avtalað varð eftirfylgjandi, at dagbøtur kundu gerast í eykaarbeiðunum á Steinatúni. Seinni boða HVT frá, at HVT ikki gongur avtaluni á møti at gjalda dagbøtur. Vísandi til ABF06 § 24, kunnu HVT ikki góðtaka dagbøtur, orsakað av tilfarsveitingum (stál), sum hevur tikið óvanliga langa tíð, mest grundað á broytingar, tillagingar v.m. Òsemjan snýr seg um eykaarbeiðini, sum eru gjørd á Steinatúni:

1 Upptøka av flísum, grevstur og burturkoyring
2 Planering
3 Hondverkarar at gera stoypiformar til plantukummu
4 Tilfar til stoypiformar
5 Reinsilag og klárgering til formar
6 Transport av formum og útgerð
7 Uppsetan av formum og armering
8 Stoypa plantukummu
9 Avforskalling
10 Fylt mold og tilfar plantukummu
11 Spagnum keypt mold (ovastu 20 cm)
12 Veitan av eyka flísum

13 Áleggjan og tilpassing av flísum
14 Tilfar til bonk
15 Bonkur
16 Byggiplássútreiðslur hegn avsperring og annað
17 Arbeiðsleiðari, avseting, uppmáting, prosjektgransking
18 Kunningarskermur
19 Niðurtøka av trappu
20 Niðurtøka av og burturflyting av náttarravnum
21 Brekkan av sokkli
22 Burturkoyring av tilfari og upprudding á staðnum
23 Ljósmastrar
24 Annað

Hesi eykaarbeiði eru øll liðugt gjørd á Steinatúni. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur samráðst við HVT um málið. Partarnir eru komnir ásamt um at gera eina semju áljóðandi 1.600.000,00 + mvg. Á hesi eykaarbeiði, svarandi til umleið 1.700.000,00 íroknað kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at:

- Flyta 1.520.000,00 av konto 6275, L62034, Vágsbotnur, skipan av økinum, á konto 6275, L62029, Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýlið og norðara síðan
  Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at fáa málið betur lýst til næsta fund.

**Ískoyti:**
Verkætlanin Steinatún Býartorg hevur havt stóran avbjóðingar frá byrjan av.

Verkætlanin er lítil í vavi, men sjálv konstruktiónin er óroynd og eindømi í Føroyum. Fyrsta avbjóðingin var, at stálarbeiðið mátti broytast og tillagast. Frá byrjan varð prosjektið hugsað sum ein samlað konstruktión, sum kundi verið bygt á einum stað og síðani transporterað oman á Steinatún í einum. Skjótt blivu fortreytirnar broyttar, tí hetta ikki bar til m.a. orsakað av tilfarsvalinum á m.a. koparinum sum yvirflatu. Kopar tolir ikki væl at vera útsett undir transport. Onnur avbjóðing hevur verið viðv. Kopararbeiðinum, at undirarbeiðstakari hjá HVT hoppaði frá, tí viðkomandi metti hetta arbeiðið vera ov trupult at gera. Somuleiðis var leveringin av stálinum sera drúgv, tá konstruktiónin ikki var roynd fyrr. Hesar avbjóðingar hava allar verið við til at seinka verkætlanini munandi.

Umsitingin hjá TK varslaði dagbøtur á verkætlanina mótvegis arbeiðstakaranum, og hevur HVT akseptarað dagbøtur pr. 3. apríl 2020. Avtalað varð millum kommununa og arbeiðstakaran eftirfylgjandi, at dagbøtur kundu innganga í ymiskum eykaarbeiðunum á Steinatúni.

Niðanfyri síggjast eykaarbeiðini, sum eru gjørd á Steinatúni:

- Niðurtøka og burturflyting av Náttarravnunum
- Nýggj plantukumma gjørd
- Planting í plantukummuni
- Flísaálegging kring plantukummuna
- Ljósmastrar
- Kunningarskermur
- El-arbeiðið
- Byggipláss, hegn, avsperring o.a.

Seinni boðar HVT frá, at HVT ikki gongur avtaluni á møti at gjalda dagbøtur. Teir grundaðu hesa niðurstøðu á §24 í ABF06, og grundaði HVT hesa niðurstøðuna við, at teir ikki kundu góðtaka dagbøtur, orsakað av tilfarsveitingum (stál), sum hevur tók óvanliga langa tíð, mest grundað á broytingar, tillagingar v.m.

Hendan niðurstøðan hjá HVT ger sostatt, at kommunan hevur fingið nakrar veitingar gjørdar, sum HVT seinni sendir rokning fyri, og sostatt uppstendur ein ósemja millum partarnar.

Samlaði kostnaðurin fyri eykaarbeiðini er áljóðandi kr. 1.988.162,00 uttan mvg., smb. HVT.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu metir at nakað av hesum kostnaðinum eigur at koma undir avtaluna um dagbøturnar, og hevur tí forhandlað við HVT um málið.

Partarnir eru nú komnir ásamt um at gera eina semju áljóðandi kr. 1.600.000,00 uttan mvg fyri eykaarbeiðini, svarandi til umleið 1.700.000,00 íroknað kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla til at:

- Flyta 1.620.000,00 av konto 6275, LK 62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, L62029, Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýlið og norðara síðan
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur gingið rimiliga væl – tó hava avbjóðingar verið frá byrjan. Endaliga úrslitið eftir semju og uppgerð er eitt yvirskot á verkætlanini á kr. 31.625,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla til:

1. At loka verkætlanina L62029 Miðbýarætlan – Steinatún.
2. At yvirskotið á kr. 31.625,00 verður deilt út aftur á konto 6275, LK 62999 løgukarmur fyri árið.
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 19/23 Nýggj høli til rakstrarstovn við Oyggjarvegin matr. nr. 1230b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 48/19 | 19/00691-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 46/19 | 19/00691-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.03.2019 | 54/19 | 19/00691-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 03.07.2019 | 45/19 | 19/00691-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 218/19 | 19/00691-1 |
| 6 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 188/19 | 19/00691-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 214/19 | 19/00691-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 13/23 | 19/00691-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 19/23 | 19/00691-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við umskipan av teknisku deild, við at leggja allan raksturin í ein stovn, hevur tekniski stjórin reist málið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í norðurendanum av maskinhøllini við Oyggjavegin eru uppsettar bingjur, har formenninir hava skrivstovu. Sum víst á í fleiri ár, so eru hølini í sera vánaligum standi og eiga at verða gjørd av nýggjum sum skjótast.

Í sambandi við ætlanina at gera ein rakstrarstovn, at taka sær av øllum rakstri á tekniska økinum í Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt eina tørvslýsing sum vísir, at brúk er fyri at byggja ein nýggjan bygning uppá 120 m2 í tveimum hæddum, íalt 240 m2.

Innrætting:
- Inngongd og móttøka
- Skrivstovur til starvsfólk
- Køkur og matarstað
- Umklæðing, wc/brúsa, vaskimaskina
- Gongir, trappa v.m.

Útbjóðing og tíðarætlan:
Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku, soleiðis arbeiðið kann byrja sum skjótast og verða liðugt í ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1230b liggur í umráðispartinum B4 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar m.a. eru:

> *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.*
> *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin frávik

**Umhvørvisárin**
Verður viðgjørt eftir umhvørvistigi 2-3

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Húsaumsitingin hevur verið við til at gera uppskot til byggingina.

**Skjøl**
19/00691-3 Tørvslýsing og kostnaðarmeting
19/00691-2 Støðumynd

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Bygningurin verður mettur til at kosta kr. 5.000.000 íroknað 6,25% mvg og fast innbúgv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at verandi skúrðar við endan á høllini við Oyggjavegin verða tiknir niður og nýggjur bygningur á 2 x 120 m2 bygdur á staðið.
- at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku, soleiðis arbeiðið kann byrja sum skjótast og verða liðugt í ár.
- at játtaðar verða kr. 5.000.000 til arbeiðið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 5 mió av tøkum pening til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. mars 2019:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá nýggju hølini við Oyggjarvegin eru innkomin. Kostnaðurin fyri hesi hølini er kr. 2,2 mió. hægri enn verandi meting, ið var 5 mió. kr. Í báðum teimum innkomnu tilboðunum er bygningurin størri enn ætlað, og hetta ger eina hækking í kostnaðinum. Harumframt eru eisini komin fleiri rúm, ið ikki vóru íroknað verandi meting t.d. vesi til rørslutarnað o.a.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:

- at játta kr. 2,2 mió. av karminum L00001 á konto 8175, til konto 6175, L61025 Nýggj høli við Oyggjarvegin, til nýggju hølini við oyggjarvegin, og
  at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. juli 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot um upskotið frá Annifinni Brekkstein um at beina málið aftur í teknisku nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.
Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt fyri meiriluta samtyktini í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 7 atkvøðum fyri, og ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekksein.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Jákup Dam fór av fundinum og Jógvan Arge tók sæti fyri hann.

Samtykt við aðru viðgerð við 7 atkvøðum fyri og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson,Bjørg Dam, Halla Samuelen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Sáttmáli bleiv undirskrivaður 16. desember 2019 við Articon um at veita skrivstovubygning í heildararbeiðstøku. Bygningurin bleiv handaður Tórshavnar kommunu 8. september 2022.

Verkætlanin 6175 L61025 Nýggj høli við Oyggjarvegin er sostatt liðug og klár at loka.

Verkætlanin hevur eina minninýtslu á kr. 119 t.kr., sum fellur aftur á íløgukarmin á konto 6175.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at loka verkætlanina Nýggj høli við Oyggjarvegin L61025, og at minninýtslan kr. 119 t.kr. fellur aftur á íløgukarmin á konto 6175.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 20/23 Yvirtøku av vegi matr. 1345k

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.01.2023 | 1/23 | 22/01222-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 14/23 | 22/01222-3 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 20/23 | 22/01222-3 |

**Upprunin til málið**

Borgarar hava í skrivi, 17. Mars 2022, spurt Tórshavnar Kommunu um hvussu gongur í málinum um at yvirtaka vegin á matr. 1345k, Tórshavn.

Undirritaði lýsa í skrivinum, at í 1993 var ein munnlig avtala gjørd, um at yvirtaka vegøkið á matr. 1345 k, Tórshavn, í tí sambandi vilja tey hoyra um hvussu tað gongur í málinum.

**Lýsing av málinum**

Ein partur av matr. 1345k er nýttur sum vegøki, hetta vegøgið er ein partur av Villingardalsvegnum. Vegurin førur út til tvey hús á einum síðuvegi á Villingardalsvegnum.

Málið viðvíkjandi matr. 1345k, Hoyvík, hevur verið til viðgerðar áður og er skrásett undir j. nr. 1999-1050. Tekniska nevnd tók á fundi 26. oktober 2001 undir við at beina málið viðv. matr. 1345k, Hoyvík, í byggi- og býarskipanarnevndina.

Tekniski stjórin mældi í hesum førum Tórshavnar Kommunu frá at ogna sær matr. nr. 1345k, grunda á at nógvir tílíkir snøklar liggja runt í býunum og verða økini yvirtikin, fylgir eisini ábyrgd við at halda tey við líka.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 14. januar 2002 at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Tá málið var viðgjørt í Byggi- og býarskipanarnevndini 14. januar 2002, var Tórshavnar kommuna ikki áhuga í at yvirtaka smærri vegøkir. Í dag er Tórshavnar kommuna meira sinna at yvirtaka smærri vegøkir, tí tað vísur seg ofta at vera torført at yvirtaka slík økir seinni.

Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og sýnað vegin. Niðurstøðan er, at vegurin er ikki í nøktandi standi til at ognast.

Um vegurin skal ognast er tørvur á betra um standin av vegnum. Kloakk og æðrar leiðingar eru í nøktandi standi, men asfaltið tørvar ábøtur áðrenn vegurin kann yvirtakast.

Um vegurin skal yvirtakast, skal tað gerast treyta av at Tórshavnar kommuna ikki skal breiðka vegin ella gera eina gongubreyt.

Umsitingin mælir til at yvirtaka vegøkið og gøtuna uml. 255 $m^2$ av matr. 1345k, og leggja tað saman við matr. nr. 1345e, Tórshavn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort – Vegøkið og gøta j.nr. 22/01222-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ̈ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
Fíggjarligu útreiðslurnar í sambandi við marknaumskipanina av vegnum á matr. nr. 1345k, Tórshavn, eru áleið 5.000 til 10.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin á matr. nr. 1345k, Hoyvík, og at kostnaður í sambandi við marknaumskipan verður fíggjaður av konto 8110 Vegir, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 21/23 Miðbýarkjarnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 157/22 | 22/03571-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 200/22 | 22/03571-1 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 186/22 | 22/03571-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 241/22 | 22/03571-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 1/23 | 22/03571-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 16/23 | 22/03571-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 21/23 | 22/03571-1 |

**Upprunin til málið**
Ein býarkjarna er tað handilsliga, mentunarliga, søguliga og landafrøðiliga hjartað í einum býi. Ein miðbýarkjarna eigur at verða innbjóðandi og at leggja upp til, at fólkið hittist og hevur fyrsta rætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir.

Hetta ynskir kommunan at stimbra undir, og hava tríggir ráðgevar fingið møguleika at lata inn tilboð uppá arbeiðið at útvega eitt skipanaruppskot/faldara av miðbýarkjarnuni, sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar* og *Dagført økið*.

Í mong ár hevur miðbýarkjarnan í Tórshavn verið merkt av bilferðslu. Bilurin hevur fyrsta rætt til flestu økini, og parkering fyllir nógv. Harafturat mugu vit ásanna, at vit búgva í einum vetrarbýi, og innrættingin av býnum átti í størri mun at tikið atlit til hetta.

Ein part av árinum hava vit tómar gøtur og eina so at siga lívleysa miðbýarkjarnu, ein sokallaðan "donut-bý". Orsøkin til hetta er m.a., at keyp á alnótini, hevur gjørt tað gjørligt at fáa sínar vørur flýggjaðar til úthurðina, umframt at kappingin frá handilsmiðstøðum er økt. Okkara býarkjarna hevur tørv á at fóta sær og livna upp aftur.

Ynski er at endurskoða miðbýarkjarnuna í tann mun, at býurin verður tættaður við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, sum fær vitjandi at støðast, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt. Her verður serliga hugsað um at varðveita tær mongu smogurnar, ið binda býin saman, smáu og snøggu býarhúsini við mønutaki, umframt bygningar so sum gamla Føroya Banka, Ebenezer, gamla Sparikassan, Býráðið, Margarinfabrikkina/Tjóðpallin.

Faldarin, sum verður latin kommununi, kemur at liggja til grund fyri framtíðar skipanini av miðbýnum og verður grundarlagið undir eini komandi serstakari byggisamtykt.

Fyrsta juli móttók kommunan trý tilboð, sum verða lýst niðanfyri, sí fylgiskjøl *Henning Larsen, SNA, BRIM og BRIM-dagførdur prísur*.

**Lýsing av málinum**
Í útbjóðingarskrivinum, varð biðið um tilboð uppá arbeiðið umframt eina frágreiðing av, hvussu uppgávan verður loyst.

SNA lat tilboð inn áljóðandi kr. 800.000 u/mvg

Henning Larsen lat tilboð inn áljóðandi kr. 840.000 u/mvg
BRIM lat tilboð inn áljóðandi kr. 850.850 u/mvg

SNA hevur lægsta tilboðið. I tilfarinum frá SNA er víst á áhugaverd diagrammir, men eingin fullfíggjað frágreiðing fyriliggur, og tí er ringt at skilja akkurát, hvussu arbeiðið verður framt. Serligt fyri hetta tilboðið er, at grønu økini (býarparkin) verða viðgjørd við princippskitsum og plantuplani.

Tilboðið frá Henning Larsen er eitt sindur lægri enn hægsta tilboðið. Tilfarið, sum tey hava latið inn, er sera gott við greiðum tekningum og lýsingum, av hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at alt arbeiðstøkuøkið verður teknað upp í talgildum 3D-forriti. Harumframt verða mikroklimatiskar greiningar gjørdar av býnum við at nýta planleggingarforritið *GreenScenaro*, ið sameinar greiningar og simuleringar av m.a. trivnaði hjá fólki og skugga, sól-, vind- og ljósviðurskifti. Hetta er ein áhugaverdur háttur at arbeiða uppá, sum vit ikki hava roynt fyrr í Tórshavnar kommunu. Hetta gevur kanningarúrslitinum objektivitet og gjøgnumskygni. Umframt hetta verður heitið "Urtagarðsbýurin" nýtt, ið er ein tulking av visiónini úr útbjóðingartilfarinum um eina býarpark. Tey citera Jørgen Franz Jacobsen:

*Í allar ættir er grønur gróður. Niðan ímillum urtagarðar, klettar og hús sker ein long spákingarleið við nógvum gongufólki. Hálvdoyvt ljóð av samrøðum teirra rennur út í sjóðið av ánni. Øll, sum hava verið í Havn, kenna tað: áin, sum rennur í skugganum av trøunum. Tað er sovorðin eyðkendur blíður dámur um henda gróðurgyrda [býin].*

og vísa á, at tey vilja endurskapa Tórshavn sum ein urtagarðsbý.

BRIM hevur hægsta tilboðið. Tilfarið frá BRIM er væl úr hondum greitt við neyvari frágreiðing um, hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at dentur verður lagdur á at arbeiða við eini neyvari endurtøku av analysum og uppskotum til býarskipan, ein sokallað repitativ process. Hetta merkir, at neyvar kanningar ligga til grundar fyri uppskotunum tey koma við.

Umsitingin hevur mett um innkomnu uppskotini, sí fylgiskjal 'Meting av tilboðum'. Allir ráðgevarnir hava latið inn nøktandi tilfar, men uppskotið frá Henning Larsen er tað, sum umsitingin metir á bestan hátt líkur ynskini fyri miðbýin og kappingartreytirnar. Umsitingin mælir til, at Henning Larsen fær í boði at gera skipanina av miðbýarkjarnuni. Uppskotið vísir á eina framúr spennandi tilgongd til arbeiðið, umframt at tey útvega eina talgilda upptekning av býnum í 3D, ið er eitt sera virðismikið tilfar í tí víðari menningini av økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu og undirliggjandi serstakar byggisamtyktir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/03571-5 Útbjóðingartilfar
22/03571-3 Dagført økið
22/03571-3 SNA
22/03571-3 Henning Larsen
22/03571-2 BRIM
22/03571-3 BRIM – dagførdur prísur
22/03571-6 Meting av tilboðum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | 6275 | Nýggj | Miðbýar-kjarnan | Ja | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- játta 1 mió. kr. til verkætlanina av konto 6275, L62052 Fríðkan av bygdunum
- heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi ráðgevan
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson settu fram broytingaruppskot um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at 1 mió. kr. verða játtaðar til verkætlanina av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Broytingaruppskotið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen, ið mæltu til, at peningurin, ið játtast skal til verkætlanina verður tikin av tøkum peningi heldur enn av konto 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum ella av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá minnilutanum um at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Turid Horn og Annika Olsen.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Heðin Mortensen setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við málinum við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at 1 mió. kr. verður játtað av LK31015, Tillagingar á dagstovnaøkinum, í staðin fyri av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjølbroyttur og grønur miðbýur' kallast Skipanaruppskotið, sum ráðgevin Henning Larsen læt inn tann 14. desembur. Ósbjørn Jacobsen leggur uppskotið fram fyri nevndini á nevndarfundinum.

Niðanfyri sæst ein stutt lýsing av endaliga úrslitinum:
Uppskotið er gjørt við tí fyri eyga at skapa lív í miðbýnum á tann hátt, at býurin verður tettur við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt.

Miðbýurin í Havn hevur, í mun til nógvar aðrar høvuðsstaðir, ikki verið ígjøgnum eina stóra umfatandi umskapan. Samleikin er ein samanrenning av søguni, byggilist, gróðri, støddarmunum, fólkum, tað óspilta, og mangt, mangt annað. Tað er júst hetta, sum ráðgevin í stóran mun hevur arbeitt við ikki at oyðileggja, men heldur at varðveita og brúka sum eitt tilfeingi í býarmenningini av miðbýarkjarnuni.

Tá hugt verður eftir tølunum, so kann í stuttum sigast, at «ongin» býr í miðbýarkjarnuni í Havn. Bert 3% av samlaðu gólvvíddini, ið telur 30.418$m^2$, eru nýtt til bústaðir. Ráðgevin hevur gjørt uppskot, har fermetrar eru umskapaðir, tiknir burtur og lagdir afturat. Í nýggja uppskotinum eru 7.578 $m^2$ lagdir afturat, svarandi til uml. 204 fleiri bústaðir í miðbýnum (her er útgangsstøði tikið í íbúðum á 75$m^2$ og lestraríbúðum á 35 $m^2$). Ein slík umskapan av einum býi skal gerast við skynsemi. Byggilistarlig atlit skulu takast, umframt at krøv til bygningin, framsíður, takhall o.a. skulu liggja til grund í einari serstakari byggisamtykt. Hetta er ein týdningarmikil liður í arbeiðinum at tryggja og varðveita ein áhugaverdan og fjølbroyttan miðbý.

Havnin er ein grønur býur. Grønur gróður sæst í allar ættir. Gomlu trøini og nógvu smáu urtagarðarnir eru eitt sereyðkenni fyri miðbýin. Tað grøna hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í býnum. Uppskotið vísir eina bilfría Niels Finsens gøtu frá Steinatúni og oman á Vaglið. Gøtan er gjørd grønari, og nýggj gróðurseting av 'allé-trøum' skapa saman við stóru gomlu trøunum eina grøna tekju yvir partar av gongugøtuni, sum

gevur økinum lívd og ein heilt serstakan ‘urtagarðsdám’. Eisini skal hesin grøni parturin virka sum fríøki hjá teimum mongu íbúðum, ið verða lagdar aftur at miðbýarkjarnuni.

Sum tað fyrr er blivið umrøtt, so er stórur tørvur á eini gjøgnumhugsaðari og framskygdari ferðslu- og parkeringarætlan í miðbýnum. Hetta eru viðurskifti, ið ikki eru avklárað í skitsuuppskotinum, og ein verkætlan, ið er klár at fara í umbúnað, tá serstaka byggisamtyktin fyri økið er gjørd. Sama er galdandi fyri teknisku leiðingarnar í miðbýnum, so sum kloakk- og vatnviðurskifti.

Í 2016 bleiv Miðbýarætlanin gjørd, sum í fyrstu syftu snýr seg um skipan av kommunalum økjum og útirúmum. Hetta skitsuuppskotið snýr seg meiri um, hvussu innihaldið av teimum ymsu útirúmunum og bygningunum í býnum kann umskapast.

Skitsuuppskotið skal síggjast sum ein langskygd ætlan, ið er gjørd við tí endamáli at skapa lív í býnum, og sum skal liggja til grund fyri broyting av byggisamtyktini. Uppskotið lýsir, hvussu høvuðsgrepini kunnu umskipast fyri at skapa lív í býnum, umframt uppskot til hvar miðbýarkjarnan kann skipast við bústøðum. Smálutir so sum flísar, vindeygu o.a. eru ikki endalig, men einans dømi um, hvussu býurin kundi sæð út.

Hetta er ein ætlan, ið fer at hava ávirkan á býin og tað virksemið, ið har er, og tí kann talan blíva um endurgjald. Samstundis sum at hendan ætlan regulerer menningina í býnum fyri at tryggja tey trivnaðarligu viðurskiftini (ljós- og skuggaviðurskifti), so gevur hetta eisini summum pørtum í býnum fíggjarligar avleiðingar, av tí at summi fáa skerdar møguleikar fyri bygging. Møguliga endurgjaldið skal tó ikki síggjast sum ein forðing, men heldur ein møgulig fylgja, ið skal til fyri at skapa ein bý, har tey trivnaðarligu viðurskiftini eru tryggjað.

Áðrenn ein serstøk byggisamtykt verður gjørd, er sera týdningarmikið at fara undir eina tilgongd at hoyra áhugapartar, ið eru beinleiðis ávirkaðir av ætlanini. Við hesum verða tey fyrst at hoyra um ætlanina og fáa møguleika at koma við viðmerkingum. Tá henda tilgongd er liðug, verður kallað inn til almenna kunning um skitsuuppskotið.
Eftir hetta verða viðmerkingar frá hoyring og kunningarfundi viðgjørdar og møguligar tillagingar av skitsuuppskotinum gjørdar, og tilgongdin at broyta byggisamtykt kann fara í gongd.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at:
- samtykkja skitsuuppskotið
- heimila umsitingini at fara undir at fyrireika fundir við áhugapartar og síðani ein kunnandi borgarafund
- heimila umsitingini at fara undir at gera serstaka byggisamtykt fyri økið við støði í skitsuuppskotinum
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 22/23 Miðbýarætlan – Býarlundin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 2/23 | 22/07295-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 15/23 | 22/07295-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 22/23 | 22/07295-1 |

**Upprunin til málið**
Ein miðbýarkjarna eigur at vera innbjóðandi og at leggja upp til, at fólk hittast og hava fyrstarætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir. Politiskt er ynski um at stimbra undir hesi viðurskifti, og í summar varð arbeiðið boðið út at gera skipanaruppskot av miðbýarkjarnuni. 14. desembur 2022 var skipanaruppskotið 'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjølbroyttur og grønur miðbýur' latið inn.

**Lýsing av málinum**
Sum partur av skipanaruppskotinum 'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjølbroyttur og grønur miðbýur' liggur uppskotið 'Grøna gongugøtan og býarlundin'.

Prátið hevur verið í mong ár um at gjørt hendan partin av Niels Finsens gøtu til gongugøtu. Royndir hava verið gjørdar, tó uttan ynskt úrslit. Úrslit aðrastaðni hava víst, at tað er sera trupult at meta um úrslitið av einari 'royndarverkætlan', tí allir partar 'bíða eftir', at royndin er liðug. Tí mugu skilvísar, men endaligar, avgerðir takast hesum viðvíkjandi.

Uppskotið vísir eitt bilfrítt strekki frá Steinatúni oman á Vaglið – tó verður loyvt bilum at koyra tvørtur um gongugøtuna á krossinum Niels Finsens gøta/Sverrisgøta, og sjálvandi skal vera gjørligt við vøru- og ruskkoyring í ávísum tíðarbilum og hjá neyðsynjarakførum at koma fram.

Somuleiðis skulu atlit havast at ólavsøkuskrúðgonguni, sum hevur ein heilt serligan leiklut og tign í býnum, at hon fær tað plássið, ið krevst oman eftir gøtuni, og at atgongd inn á Tinghúsvøllin verður varðveitt.

Gongugøtan skal hugsast sum ein 'pallur', ið bjóðar inn til ymiskt og fjøltáttað virksemi, bæði gerandisdagar og til serstøk høvi. Gøtan skal gerast grønari, og nýggj gróðurseting av 'allé-trøum' skapa saman við stóru gomlu trøunum umframt nýggju Havnará eina grøna 'tekju' yvir partar av gongugøtuni, sum gevur økinum lív og ein heilt serstakan 'urtagarðsdám'.

Verkætlanin 'Grøna gongugøtan og býarlundin' er ein lendisskipan og ein plantuætlan av strekkinum á Niels Finsens gøtu úr Steinatúni og oman til Vaglið, umframt ráðhúsplássið og Eik-garðurin (býarlundin). Uppskotið vísir harumframt á, at ráðhústorgið kann vera skipað við parkering undir jørð, innbygdari skoytubreyt og flytiligum møblum við grønum plantukummum, sum geva møguleika fyri fjølbroyttari nýtslu alt árið, og sum eru ómakaleysir at flyta í sambandi við størri tiltøk sum konsertir, skoytubreyt o.a. Býarlundin skal vera ein grøn lund við t.d. smábarnaspæliplássi og eini multifunktionellari, partvíst yvirdekkaðari pavillon til tiltøk og framsýningar.

Við at gera gongugøtuna bilfría og urtagarðskenda, fáa nýggju ætlaðu bústaðirnir í miðbýarkjarnuni eitt uttandura fríøki til uppihald. Tað verður neyvan pláss fyri at uppfylla vanligu kravdu áseting um fríøki til allar hesar íbúðirnar, og tí kunnu grøna gongugøtan og býarlundin virka sum eitt fríøki til hesar bústaðirnar.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt at fara undir at gera skipanaruppskot av arbeiðstøkuøkinum 'Grøna gongugøtan og býarlundin' fyri síðani at meta um, hvussu vit kunnu býta skipanaruppskotið í undirøki, ið síðani verða liðugt projekterað og sett í verk. Her kundi 'Býarlundin' (eik-garðurin) verið fyrsta raðfesting.

Í hesum sambandi er sera týdningarmikið at fara undir eina tilgongd at hoyra áhugapartar, ið eru beinleiðis ávirkaðir av grønu gongugøtuni og býarlundini. Tá henda tilgongd er liðug, verður kallað inn til almenna kunning um uppskotið.

Umsitingin hevur heitt á ráðgevan um at upplýsa ein kostnað fyri arbeiðið at gera eitt neyvt skipanaruppskort av 'Grønu gongugøtuni og býarlundini'. Kostnaðurin er áljóðandi kr. 187.200 u/mvg.

Afturat hesi upphædd er skynsamt at rokna eina óvissu uppí, ið vanliga verður sett á 10% umframt útreislur fyri møguligar uppmátingar, fundir, prent o.a.

Sostatt er talan um ein samlaðan kostnað áljóðandi kr. 300.000 fyri gerð av skipanaruppskoti og fyrireikan av útbjóðing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/03571 Miðbýarkjarnan

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | xx | Miðbýarætlan - Býarlund | Nýggj verkætlan | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 300.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |

| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |
|---|---|---|

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta kr. 300.000 av konto LK62996 Miðbýarætlan á nýggja verkætlan við heitinum Miðbýarætlan – Býarlund
- at umsitingin og ráðgevi fara undir at lýsa verkætlanina, gera neyðugar kanningar og seta í verk skipanaruppskotið
- at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út eftirfylgjandi
- at avvarðandi nevndir verða kunnaðar so líðandi
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 23/23 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 3/23 | 22/07300-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 23/23 | 22/07300-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin ivi er um, at við einum fjølbroyttum bústaðarmarknaði kann kommunan virka fyri eini fjøltáttaðari fólkasamanseting. Týdningarmikið er, at fjølbroytni vísir seg innan bústaðarsløg. Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum í kommununi, men ikki nógv lendi er eftir. Í Føroyum hevur ikki verið siðvenja at byggja háhús. Fyrimunurin við hesi búseting er, at lendið verður gagnnýtt á ein munagóðan hátt. Vansin er tó, at háhús kunnu ávirka útsýnið hjá verandi bústøðum umframt kennast stór í vavi. Tí er sera týdningarmikið, at staðsetingin av hesari bygging er gjølla kannað. Kommunan kann gera sítt fyri at stýra planleggingini ávísar vegir, t.d. við at útleggja tey kommunalu grundstykkini við ávísum ásetingum. Í hesum sambandi verður farið undir at broyta byggisamtyktina framvið hamarinum á Villingardalsvegnum og suðureftir, frá at vera A3, blandað bústaða- og miðstaðabygging, til A2, hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.

**Lýsing av málinum**
Matriklarnir 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 liggja vestan fyri Villingadalsvegin. Matriklarnir liggja sum ein leinging av einum hamara. Hamarin gongur sum ein rond allan vegin suðureftir oman framvið Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga hevði tað verið upplagt at nýtt tøku matriklarnar framvið hamarinum til hægri bygging. Bæði tí at teir ikki taka útsýnið frá nøkrum, bygningarnir kunnu fáa útsýni yvir allan býin, umframt at hamarin skapar lívd frá vesturættini.

Sum nú er, liggja matriklarnir í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí fylgiskjal *Áðrenn broyting*. Ætlanin er at broyta ásetingarnar fyri hesar matriklarnar til økisáseting A2 í almennu byggisamtyktini, sum er ætlað høgari bústaðabygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A2 í 3. grundumráði eru:

*1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

*2. Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

*3. Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

*4. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

*5. Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/07300-2 Áðrenn broyting
22/07300-2 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn, sambært kortskjali *Eftir broyting* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 24/23 Nýggj ljósskipan á Tórsvølli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 20/23 | 22/05163-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 7/23 | 22/05163-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.01.2023 | 24/23 | 22/05163-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 26/23 | 22/05163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 24/23 | 22/05163-1 |

**Upprunin til málið**
Ljósskipanin á Tórsvølli er við at ganga fyri og lýkur ikki longur krøv.

**Lýsing av málinum**
Verandi mastrar og ljósskipan á Tórsvølli vórðu bygd í 2011. Tey fyrstu árini riggaði ljósskipanin væl, men seinastu árini eru avbjóðingarnar við ljósskipanini vorðnar størri og størri, har hon m.a. sløknaði heilt undir landskappingardysti í heyst.

Rakstrar- og viðlíkahaldsavtalur eru gjørdar við tvær fyritøkur hesi árini, umframt at Ítróttaranlegg eisini hevur tikið sær av onkrum viðlíkahaldi.

Fyritøkan, ið tekur sær av viðlíkahaldinum av streyminum og projektørunum, gjørdi vart við, at øll ljósskipanin er í ringum standi og tað er ringt at fylgja við øllum avbjóðingunum. T.d. eru projektørarnir sera illa farnir, fuktur er í øllum dósum, og tilfarið dettur sundur og vandi er fyri, at tilfar kann detta niður.

FSF og kommunala umsitingin eru samd um, at neyðugt er at skifta ljósskipanina út, og fóru í heyst undir ávísar fyrireikingar. Tíðarætlanin er, at nýggja ljósskipanin er liðug til landsdystirnar í juni 2023. Vandamál í hesum sambandi er drúgv tíð í mun til framleiðslu og flutning.

Uppsetingin skal í gongd í apríl og arbeiðið skal verða liðugt ikki seinni enn seinnu hálvu av mai 2023.

Í hesum sambandi hevur UEFA viðmælt at brúka ensku fyritøkuna ISS sum ráðgeva. Fyritøkan er hin fremsta innan ráðgeving av stadionljósum í Evropa og verður millum annað nýtt av UEFA, FIFA og Premier League. Ráðgevin hevur eftirfylgjandi verið í Føroyum og hevur m.a. staðið fyri forkanning, kravfesting, projektering og útboði, og aðrir partar av uppgávuni er sáttmálar og eftirlit.

Veitingin byrjar frá talvuhúsinum. Talan er um LED-projektørar í mastrunum og stadiontakinum.

Ráðgevin (ISS) viðmælti at bjóða arbeiðið út millum tveir stórar ljósskipanarveitarar – Musco og Signify/Philips, sum báðir kunnu geva nøktandi góðskugarantiir uppá ljósskipanina bæði viðvíkjandi tepru tiðarætlanini og haldførinum yvir ár. Í hesum sambandi fingu veitararnir upplýst tríggjar el-fyritøkur í Føroyum, sum kundu viðmælast sum møguligar undirveitarar teirra.

Arbeiðið varð boðið út í november og tilboðini komu inn 13. desember 2022.

Bæði Musco Lighting Europe og Signify hava latið inn tilboð at gera nýggju stadionljósini á Tórsvølli. Musco hevur latið tvey tilboð inn, meðan Signify saman við Install hevur latið inn eitt tilboð. Tilboðini eru hesi:

| Veitari | Ljósskipan íroknað 10 ára garanti- og tænastuavtalu - |
|---|---|
| Musco, tilboð 1 | €1.120.000 (uml. kr. 8,3 mió) |
| Musco, tilboð 2 | €1.020.000 (uml. kr. 7,6 mió) |
| Signify/Install | €1.529.847 (uml. kr. 11,4) |

Musco Lighting eigur sostatt tvey tey lægsta tilboðini. Frá ráðgevanum verður mælt til at taka av tilboði 1 frá Musco kr. 8,3 mió. Grundgevingin fyri hesum er, at tað í hesum tilboðnum verða nýttir LED projektørar av betri góðsku enn í tilboði 2. Sambært ráðgevanum tryggjar Tórsvøllur sær við hesi loysn best møguligu ljósviðurskifti komandi 10 árini.

Umsitingin saman við FSF mælir til at taka av tilboði 1 frá Musco.

Umframt útreiðslur til sjálva ljósskipanina, eru í verkætlanini eisini aðrar útreiðslur til annað el-arbeiði við eitt nú talvum, ráðgeving frá IIS og LBF, tryggingar og mvg. Við støði í tilboði 1 verður samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina kr. 11 mió.

Samstarvsavtala
Verkætlanin verður skipað á sama hátt sum onnur byggistig av Tórsvølli, har Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunan hava gjørt samstarvsavtalur. Henda samstarvsavtalan fevnir um at dagføra og endurnýggja ljósskipanina á Tórsvølli innanfyri ein karm uppá kr. 11 mió, har hvør parturin rindar helmingin av kostnaðinum. Sí uppskot til samstarvsavtalu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: |
|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| | | |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 5775 | Ítrótta-anlegg | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | L570xx |

| Upphædd |
|---|
| 5.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Des 2022-juni 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamáleiðarin mæla til:

- at samtykkja uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um at dagføra og endurnýggja ljósskipanina á Tórsvølli,
- at heimila umsitingini saman við Fótbótssambandi Føroya at gera sáttmála um veiting og uppseting av ljósskipan sambært tilboði 1 frá Musco,
- at játta kr. 5,5 mió av løgukontu 5775 L57015 Langhylur til nýggja løgukontu 5775 Tórsvøllur ljóskipan at játta aftur seinni í inniverandi fíggjarári, og
- at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Vìst verður tilmælið omanfyri um at játta kr. 5,5 mió av langhylsverkætlanina tó so, at upphæddin verður at játta langhylgsverkætlanina aftur. Niðanfyri er uppskot til kr. 5,5 mió av rakstrarkontum, sum hava staðfest minninýtslu í 2022.

| | |
|---|---|
| 1110 Býráðið | 200.000 kr. |
| 1310 Býráðsskrivstova | 300.000 kr. |
| 1312 Trivnaðarfyrisitingin | 200.000 kr. |
| 1317 Heilsu- og umsorganartænastan | 300.000 kr. |
| 1560 Tænastumannaeftirlønir | 500.000 kr. |
| 2721 Røktartænastur | 900.000 kr. |
| 2731 Gjøld fyri røktartænastur | 500.000 kr. |
| 2750 Ansingarsamsýning | 500.000 kr. |
| 6111 Leiga traðir og økir | 225.000 kr. |
| 7317 Talgilding til borgaran | 300.000 kr. |
| 7710 Ferðavinnan | 300.000 kr. |
| 20190 Aðrar útreiðslur | 1.275.000 kr. |

**Tilmæli**:
Stjórnin mælir til at samtykkja tilmælini til fundin í mentamálanevndini 17. januar 2023.

Stjórnin mælir harumframt til at flyta tilsamans kr. 5,5 mió av omanfyri nevndu rakstrarkontum til løgukontu 5775 L57015 Langhylur.

**Mentamálanevndin 25. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 25/23 Kunning/fráboðanir í 2023 til býráðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 25/23 | 23/00147-1 |

Kunning/fráboðanir til býráðið 26.01.2023:

-

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** einki á skrá.

## 26/23 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 143/21 | 21/01777-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 52/21 | 21/01777-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 216/21 | 21/01777-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 224/21 | 21/01777-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 22/22 | 21/01777-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2022 | 76/22 | 21/01777-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 93/22 | 21/01777-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 61/22 | 21/01777-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 88/22 | 21/01777-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.08.2022 | 155/22 | 21/01777-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 08.08.2022 | 51/22 | 21/01777-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.08.2022 | 193/22 | 21/01777-1 |
| 17 Býráðsfundur | 09.08.2022 | 174/22 | 21/01777-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 213/22 | 21/01777-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 07.11.2022 | 72/22 | 21/01777-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 9/23 | 21/01777-1 |
| 21 Tekniska nevnd | 24.01.2023 | 2/23 | 21/01777-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 28/23 | 21/01777-1 |
| 23 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 26/23 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um áleið 163.000 $m^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.
- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá Tórshavnar kommuna hevur fingið til vega lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn, og lendið sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, er neyðugt við eini tilgongd at fyrireika økið til byggibúning.

Lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn og lendið uttan fyri Argjahamar er soleiðis háttað, at tað er av størsta týdningi, at greiða fyrst fæst á, hvussu infrakervið í økinum verður skipað fyri á optimalan hátt at knýta saman byggilendi. Eisini er neyðugt út frá hesum at gera skipanaruppskot fyri byggingina, grøn øki, parkering o.s.fr. Til hetta krevst ein projektering av vegum, leiðingum og møguligum byggiøkjum í 3D.

Mett verður, at hetta projekteringsarbeiðið til skipanaruppskot í fyrstu syftu kann gerast av uttanhýsis ráðgeva innan fyri eina rammuupphædd á kr. 200.000,-. Málið verður lagt aftur fyri nevnd, tá innleiðandi projekteringsarbeiðið er komið á mál uml. einar 4 vikur eftir at peingurin er játtaður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan, "Útstykking oman fyri Argjahamar" undir kt. 6475, Byggibúning bústaðir, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og bárskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at peningurin verður játtaður av kto 6475 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringsarbeiði til skipanaruppskot er framt og handað umsitingini. Arbeitt verður fram ímóti, at gera útboðstilfar, at bjóða arbeiðið út eftir. Til hetta arbeiðið og onnur arbeiðir í sambandi við fyrireikingar av útstykkingini verður mett, at tørvur er á upp til kr. 2.000.000,- í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtað verður kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, at fremja fyrireikingararbeiði til at seta útstykkingararbeiðið í gongd. Hetta verður fíggjað av keyp og sølu.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tá tað í heyst varð farið undir at skipa útstykkingina oman fyri Argjahamar, tá var hægsta raðfestingin at fáa lagt vegin so skynsamt sum gjørligt í lendið, fyri síðani at planleggja ítøkiligu bygginga á staðnum. Yvirskipaða skipanin av økinum er nú liðug og sæst á hjálagda skjali "*Uppskot_Útstykkingar oman fyri Argjahamar_Støðumynd*" j.nr. 21/01777-30.
Hendan skipanin, í mun til hvørji bústaðarsløg í síðsta enda fara at verða loyvd í økinum, kann broytast í tilgongdini, men er ætlanin at fyrihalda seg í størstan mun til hesa skipanina.

Sum omanfyri greitt frá, so hevur tað alla tíðina verið týdningarmikið at fáa lagt vegin rætt, og er fyrsta strekkið av vegnum nú liðugt projekterað og klárt at bjóða út. Talan er um vegastrekkið frá rundkoyringini á Argjahamri og út til vegin hjá festaranum, sum leiðir allan vegin út í grótbrotið á Glyvursnesi. Hetta strekkið, sum verður boðið út, er uml. 600 m.

Til hetta ítøkiliga vegastrekkið, sum verður ein sambindingarvegur í útstykkingini, knýta so hinir vegirnir seg í, og útfrá teimum verða so áleið 200 bústaðir og barnagarðurin knýttir í.

Ætlanin er, at hetta ítøkiliga vegastrekkið verður fíggjað av komandi bústøðum og barnagarðinum. Hetta er líknandi tilgongd, sum vit kenna frá eitt nú Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt.

Ætlanin er at fara undir framhaldandi projekteringina av útstykkingini beinanvegin, soleiðis at tá sambindingarvegurin, sum nú fer í útboð, er liðugt bygdur, so er klárt at fara undir írestandi vegir og fyri síðani at bjóða økir til bústaðarbygging út.

Til hesir arbeiðir verður mettur ein fíggjarligur tørvur á kr. 6 mió. har uml. 4 mió. kr. fara til bygging av sambindingarvegnum og 2 mió. kr. fara til framhaldandi planlegging og projektering av útstykkingini.

Ætlanin er at játta peningin av tøkum peningi, sum krevur tvær viðgerðir í býráðnum. Til aðru viðgerð í býráðnum er ætlanin at koma við eini nærri lýsing av málinum, har ein ítøkilig tíðarætlan, kostnaðarætlan og søluætlan fyriliggja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða sambindingarvegin út og at gera sáttmála við vinnandi arbeiðstakaran.
- At heimila umsitingini at halda fram við projekteringini av útstykkingini.
- At játta kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- At játta kr. 4.000.000,- á verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- Verkætlanin verður eftir ætlan fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum til bústaðir og barnagarð innanfyri umleið 1 ár.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**:
LBF P/f hevur vegna Tórshavnar kommunu prosjekterað útstykkingina og boðið útstykkingararbeiðið út til tríggjar arbeiðstakarar.

Hesi tilboð komu inn:

| | |
|---|---|
| MT Højgaard Føroya P/f: | kr. 44.288.470,- |
| J&K Petersen P/f: | kr. 58.895.479,- |
| Articon P/f: | kr. 57.236.594,- |

Við støði í tilboðnum frá MT Højgaard Føroyar og fyrireikandi arbeiðum, sum longu eru í gerð, hevur umsiting kommununar latið gera eina samlaða kostnaðarmeting, har útreiðslur fyri prosjektering, útboð, byggileiðslu, fakeftirlit, byggiharraveitingar, umsiting, tryggingar og MVG v.m. eru íroknað.

Um tikið verður av lægsta tilboðnum, sum er frá MT Højgaard Føroya P/f, metir umsitingin at samlaða útstykkingararbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 62.213.000,- sambært samlaðu kostnaðarmetingini (sí j.nr. 21/01777-51). Í samband við útstykkingar av hesi støddini vísa royndirnar, at neyðugt er við tøkupeningi til avleidd arbeiðir, sum falla uttan fyri arbeiðstøkuna og vísa seg, aftaná at arbeiðið er handað, og eru neyðug fyri útstykkingina. Mett verður, at leggjast skulu til síðis kr. 4.000.000,- sum ikki gerast tøkar fyrr enn arbeiðið, at gera útstykkingina er handað kommununi. Samlaði kostnaðurin fyri útstykkingina er sostatt kr. 66.213.000,- íroknað arbeiðið, sum longu er í gongd at gera arbeiðsveg á økinum.

Afturat hesum kostnaðum kemur kostnaðurin fyri lendið, sum er fingið til vega á uml. kr. 13.000.000,- Hetta gevur ein samlaðan kostnað á kr. 79.213.000,-

Av 129.280 $m^2$, sum eru keyptir til verkætlanina, verða 37.610 $m^2$ nýttir til grundstykkir til sethús, raðhús og íbúðir. Við atliti til, at tørvurin á íbúðum ikki er eins stórur og hann áður hevur verið, meðan tørvurin á raðhúsum o.l. ikki í sama mun er nøktaður, eru stykkini, sum vóru ætlað til íbúðarbygningar broytt til

raðhús. Her er nú talan um 42 sethúsaeindir, 98 raðhúsaeindir og 10 íbúðareindir, í alt 150 búeindir (sí j.nr. 21/01777-47). Henda broytingin viðførir kortini, at samlaða potentiella mesta nýtsluvíddin økist við 1490 m².

Planeraðu og byggibúnaðu stykkini verða sett til sølu, so hvørt sum arbeiðið at byggibúna fer í gongd, og fíggjar henda sølan kostnaðin av útstykkingini. Tað finnast fleiri hættir at seta prís á økini, har tann mest einfaldi hátturin er at býta kostnaðin av útstykkingini út á keypta fermetratalið. Tá verður kostnaðurin við verandi kostnaðarætlan kr. 2.106,17 fyri fermeturin (sí j.nr. 21/01777-50) Ein annar háttur kann vera, at gjaldið fyri hvørt stykki samsvarar við nettonýtsluna á stykkinum. Tað vil siga, at kostnaðurin á einum stykki verður lutfallið av mest loyvdu bygging á stykkinum býtt við mest loyvdu bygging á allari útstykkingini, faldað við kostnaðinum av allari útstykkingini. Fyrri hátturin tekur atlit til javnt býti av kostnaðinum fyri at gera hvønn fermetur byggibúnan, meðan seinni hátturin tekur atlit til javnt býti í mun til, hvussu nógv kann byggjast á hvørt stykki. Áðrenn kostnaðirnir fyri seinna útrokningarháttin verða ásettir, er neyðugt, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, sum staðfestir nýtslustigini í ymisku pørtunum av útstykkingini.

Av tí at tøkur peningur á játtanini til útstykkingina er 6.200.000,- er fíggjartørvurin áljóðandi kr. 60.012.377,- til at gera útstykkingina lidna.

J.nr 21/01777-48 vísir yvirlit yvir ætlaðu likviditetsgongdina fyri verkætlanina saman við grovari tíðarætlan.

Hjáløgd skjøl til hetta ískoyti:
21/01777-47
21/01777-48
21/01777-50
21/01777-51

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini, at gera sáttmála við MT Højgaard Føroyar um verkseting av útstykkingararbeiðinum við støði í tilboði teirra og at játta útlegg fyri arbeiðið fram til sølu av grundøkjum í 2024.

Tøka játtanin til ústykkingararbeiðið á konto L64018 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475, Byggibúning bústaðir (íløgur), er kr. 6.200.000,-.

Við støði í samlaðu kostnaðarmeting mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til, at játtað verður írestandi upphæddin á kr. 60.012.000,- til útstykkingararbeiðið, fíggjað av tøkum peningi á konto L64018 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475, Byggibúning bústaðir (íløgur) av tøkum peningi, sum aftur verður fíggjað av sølu av grundstykkjum, og at málið verður beint víðari í Býráðið til aðru viðgerð umvegis Teknisku nevnd og Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 09. august 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Íbúgvar á Viðargøtu í verandi útstykking á Hamrinum á Argjum hava mótmælt, at raðhús verða bygd millum framhaldið av Glyvursvegnum og verandi raðhús í ovara borðinum av Viðargøtu. Víst verður á, at íbúgvarnir hava fingið lyfti um, at einki skuldi byggjast í hesum økinum, og at økið skuldi liggja sum grønt

øki sambært tekning av økinum á heimasíðu kommununar 21. juni 2021. Hetta eru lyftir, sum íbúgvarnir siga seg hava fingið frá umboðum fyri umsitingina í kommununi og ávísum politikarum eisini.

Umsitingin kann kortini ikki kenna aftur hesi lyfti, og eru tey ikki skrásett í nøkrum samskifti millum partarnar. Tekningin, sum víst verður til, er ikki mynd fyri endaliga skipan av økinum, men heldur partur av tilgongdini at skipa økið.

Um sami leistur fyri umrøddu raðhús verður brúktur, sum fyri raðhúsini á niðara partinum av Viðargøtu, so verða tað um 13 metrar frá raðhúsunum á Viðargøtu til niðaru øksl av vegnum inn til nýggju raðhúsini, vegurin verður 8 m breiður, og síðani verða uml 10,5 m frá ovaru øksl til nýggju raðhúsini (sí skjal 21/01777-47 “Uppskot til organisering av útstykking juni 2022.pdf”). Hetta er í alt uml. 31 m millum gomlu raðhúsini og tey nýggju. Ovara síða av nýggju raðhúsunum kemur at vera umleið 10,5 m frá økslini av framhaldinum av Glyvursvegnum, og verður hæddarmunurin ikki eins stórur, og hann er millum gamla vegin út á Glyvursnes og verandi raðhús. Verður hesin leistur brúktur, er rúm fyri 16 raðhúsum í hesum økinum. Hetta er uml 7-8 % av samlaða ætlaða talinum av búeindum í útstykkingini.

Umrødda økið, sum íbúgvarnir mótmæla, at bygt verður á, er tað økið, sum er skjótast at gera byggibúgvið, og tað sum tí fyrst kann veita kommununi fleiri bústaðir í hesi útstykkingini. Útstykkingin skal í aðrar mátar lúka treytirnar fyri fríøki, spæliplássum og grønum økjum, sum eru ásettar í byggisamtyktini. Tí verður ikki mett, at tað er alneyðugt, at júst hetta økið verur brúkt til fríøki.

Hóast umsitingin skilir ynskið frá íbúgvunum á Hamrinum um, at umrødda økið verður lagt út sum fríøkið, og gamli vegurin brúktur sum gonguleið, so verður mett, at tørvurin á bústøðum gongur fram um hesi ynski, tá grøn øki og frílendi kunnu og verða løgd av aðrastaðni í útstykkingarøkinum.

**Skjøl**
22/05464-1 Mótmælisskriv frá íbúgvum í Viðargøtu um bygging á Argjahamri

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við, at økið millum framhaldið av Glyvursvegnum og raðhúsini á Viðargøtu ikki verður lagt av til frílendi, grønt øki ella spælipláss burtur av, men framhaldandi kann vera partur av skipanararbeiðinum fyri útstykkingina omanfyri Argjahamar, herundir eisini sum bústaðarøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 07. november 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**

<u>Stutt um yvirskipaðu ætlanina</u>
Økið, sum verður stykkjað út, leggur seg uppat býlinginum uppi á Argjahamri, skúlanum á Argjahamri og dagstovninum á Argjahamri, sum verður útbygdur suðureftir.
Í yvirskipaðu útstykkingarætlanini verður pláss fyri áleið 190 búeindum umframt bygging til stovn og miðstaðarvirksemi. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum.

Miðað hevur verið ímóti at skipa útstykkingina út frá verandi grannalagi, sum er samansett við sethúsum og raðhúsum. Sostatt hevur tað verið ynskiligt, at komandi bygging í økinum fær nakað líknandi dám.

Talan er um blandaða bygging, har eitt øki er lagt av til handil/tænastuvirksemi, umframt 82 raðhús, av teimum kunnu 37 eisini innrættast við 2 íbúðum. Harumframt er útstykkingin í sunnara endanum skipað

við áleið 46 sethúsum, einum grundøki til bústovn framvið høvuðsvegnum og einum øki til bygging av bygningi til miðstaðaendamál við áleið 22 íbúðum í ovaru hæddunum.

Sí samlaðu útstykkingina á viðhefta skjali, j.nr. 21/01777-69, Verkætlanarlýsing útstykking omanfyri Argjahamar.

Vegirnir, ið knýta økið saman, eru 6 í tali. Í skjalinum, verða teir lýstir sum «Linja 1-6»

Ein nýggjur Glyvursvegur (Linja 1) við súkklubreytum verður høvuðsvegurin í ætlanini og verður knýttur í rundkoyringina á Argjahamri, har møguleiki verður at leingja hann seinni til fleiri útstykkingar suðureftir ímóti Glyvursnesi.
Allir vegirnir í ætlanini knýta seg í nýggja Glyvursvegin, uttan «Linja 6», sum verður knýtt í Rygsgøtu.

Gamli Glyvursvegurin (Linja 3) verður gjørdur um til ein blindveg við innkoyring úr erva frá nýggja Glyvursvegnum.

Yvirskipaða útstykkingarætlanin er skipað í byggiøkir, sum verða deild upp og lýst leys at keypa so við og við sum tey gerast søluklár. Sí mál «Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging, journal nr. 22/07223».

Í tilgongdini hava íbúgvar í Viðargøtu gjørt vart við sína ónøgd, í sambandi við at ætlanin er at byggja framvið linju 3 – øki 1. Íbúgvarnir hava víst á, at tey ikki ynskja at hesi raðhúsini verða bygd. Tey ynskja, at økið verður brúkt til fríøki. Umsitingin skilur væl ynski hjá íbúgvunum, men vísir eisini á, at tað er stór bústaðarneyð í kommununi, og tilskil er tørvur á at nýta tey lendi, sum eru lætt atkomulig og lætt byggibar.

Upprunaliga var ætlanin at byggja 16 raðhús framvið vegnum í ovara borð, men talið er lækkað niður í 11 raðhús í tilgongdini. Umsitingin hevur kannað eftir, hvussu hesi raðhúsini í minst møguligan mun koma at ávirka verandi grannar í økinum, og tí er ætlanin at hesi raðhúsini einans verða bygd í tveimum hæddum. Kanningarnar vístu, at við einans at byggja í tveimum hæddum, umframt at gera ein lítlan volla framvið vegnum í niðara borð, so minka árinini av innliti til grannarnar heilt nógv. Harumframt hevur umsitingin kannað, hvussu byggingin kemur at ávirka grannarnar í mun til sól- og skuggaviðurskifti. Sí skjøl, sum vísa hetta, j.nr. 21/01777-68, Innlit til grannar á Viðargøtu og j. nr. 21/01777-68, skuggadiagram raðhús.

<u>Stutt um prosjekteringina</u>
6. apríl í 2022 gjørdi Tórshavnar kommuna avtalu við P/f LBF um prosjekteringina av vegum og útstykking í sambandi við útstykkingina omanfyri Argjahamar, sí j. nr. 21/01777-42.

Ráðgevaraavtalan umfataði:

1. Prosjekteringina av liðuggerð av høvuðsvegunum (framhald av Glyvursvegnum),
2. Prosjektering av vegi, byggibúning, planeringum og leiðingum í sambandi við vegin vestureftir frá framhaldinum av Glyvurvegnum
3. Prosjektering av vegi, byggibúning, planeringum og leiðingum oman fyri verandi Viðagøtu.
4. Prosjektering av spreinging og grovplanering til økini sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, til at virka sum stuttflutt tilfarsgoymsla.
5. Veitingar í sambandi við hesi arbeiði.

Klárt er nú at víðka hesa ráðgevara-avtaluna við P/f LBF um liðuggerð av økinum sunnan fyri verandi Argjahamar (Sethúsaútstykkingin – øki 2). Eisini má takast við í hesa avtalu at prosjekterað verður í mun til ymiskar íkomnar broytingar, ið eru gjørdar í mun til skipanina av økinum.

Hetta vóru lutir, sum ikki vóru umfataðir av upprunaliga ráðgevarasáttmálanum. Sáttmáli skal gerast við ráðgevan um, at prosjektera verður soleiðis, at arbeiðið kann bjóðast út og fremjast

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Útstykking omanfyri Argjahamar, matr.nr. 256, Kirkjubøur,* journal nr. 22/07317.
- *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* journal nr. 22/07223.

**Hjáløgd skjøl:**
j.nr. 21/01777-42, Ráðgevaraavtala um Høvuðsprojekt Oman Argjahamar
j.nr. 21/01777-68, Innlit til grannar á Viðargøtu
j.nr. 21/01777-68, skuggadiagram raðhús
j.nr. 21/01777-69, Verkætlanarlýsing útstykking omanfyri Argjahamar

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- taka undir við skipanini av útstykkingini
- heimila umsitingini at gera avtalu um liðugtprosjektering
- játta kr. 452.000 av verandi játtan á kt. L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar til prosjektering
  beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við einari hædd omaná.

**Tekniska nevnd 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

# 27/23 Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 10/23 | 22/07223-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 29/23 | 22/07223-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 27/23 | 22/07223-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum og grundøki í Tórshavnar kommunu. Sambært kommunuætlan frá 2020 er tað, við væntaða fólkavøkstrinum, tørvur á útvið 3.000 nýggjum bústøðum fram til 2032. Tað er í miðal einar 250 nýggjar bústaðir um árið síðan 2020. Fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna veita møguleika fyri at byggja so nógvar bústaðir, er neyðugt at vaksa um verandi bý, bæði við at byggja tættari í verandi býarøkjum og við at útvega meira lendi til býarvøkstur. Í hesum sambandi verður lendið oman fyri Argjahamar útnevnt sum eitt av teimum økjunum, ið liggur sum fremsta raðfesting til býarmenning.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða ein part av matr.nr. 256, Kirkjubøur (Argir), til bygging av bústøðum, vinnu og stovnum. Ætlanin er, at økið skal kunna rúma eitt stað ímillum 170-190 bústøðum, t.e. íbúðir, raðhús og sethús. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum.
Lendið liggur oman fyri verandi bústaðarøkið Klingurstjørn, skúlan og dagstovnin á Argjahamri og bústaðarøkið á Hamrinum.

Samlaða økið verður skipað í bústaðartyssi, har hvørt tyssi ávikavist er deilt upp sum raðhúsabygging við fríøki og parkering, og sum ein blanding av raðhúsa- og íbúðarbygging við fríøki og parkering, undantikið øki 2, ið einans verður sethús, og øki 4, sum verður skipað við vinnuvirksemi í gøtuhædd og íbúðum í ovaru hæddum, umframt fríøki og deili-parkering til dagstovnin og vinnuligt virksemi.

Yvirskipað fyri alt økið er at fáa eina bygging við í mesta lagi 4 hæddum og eina bygging við mønutekju, soleiðis at byggingin verður lagað til verandi bústaðardám.

Sí skipanina av økjunum í viðheftu tekning, j.nr. 22/07223-3, Skipan av øki_útstykkking omanfyri Argjahamar.

Útstykkingin er ávegis, sí mál nr. 21/01777 “Útstykking oman fyri Argjahamar”, har yvirskipaða ætlanin fyri útstykkingina er lýst. Harumframt verður farið undir at gera sertaka byggisamtykt fyri alt økið, sí mál nr. 22/07317 “Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykkning omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur”, sum somuleiðis í yvirskipaðum teksti lýsir ætlaðu ásetingarnar fyri hvørt øki sær.

<u>Ætlanin er at bjóða bústaðabyggingina út í stigum sambært niðanfyri standandi raðfesting.</u>

1. Fyrsta raðfesting er at bjóða
   a. lendi vestanfyri verandi raðhúsaøkið á Viðargøtu út til bygging av 11 raðhúsum, sí øki 1 á tekning – bygging framvið linju 3. Hetta økið er fevnt av umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini. Í umráðisparti A1 er ikki neyðugt at gera serstaka byggisamtykt, tá stykkjast skal út til raðhús, men eitt “serloyvi” krevst – sum merkir at útstykkingin einans skal góðkennast av býráðnum. Tí er tað hesin parturin av útstykkingini, ið kann fáast skjótast frá hondini í mun til eitt útboð, tó treytað av, at arbeiðstakarin raðfestir hetta økið fremst.
   b. lendi til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2.
   c. lendi til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2.

2. Næsta raðfesting er at bjóða írestandi lendir út til bygging av raðhúsum, íbúðum, bústovni, sethúsum og eitt øki til vinnu.

Samlaða økið er áleið 130.000 $m^2$ til víddar, íroknað vegir, fríøkir o.a.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Ásetingar fyri umráðispart A3 í 3. Grundumráði eru:**

1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
4. Byggistig 0,3
5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykki, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.
6. Hús við vanligari mønureising mugu einans byggjast í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 metrar til hægsta punkt við útvegg og 9 metrar til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi vera 6 metrar til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi 7,5 metrar.
8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 metrar, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 metrar.
9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tali av hæddum, verða loyvt at byggja hægri og skipað so fyri, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. Grundumráði eru:**

1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil. Í samband við eitt natúrliga avmarkað øki, har flestu grundstykkini eru minni enn ásetingarnar í pkt. 2 loyva, kann byggivaldið geva serloyvi til at víkja frá ásettu støddini á grundstykkjunum. Hetta fyri at varðveita dámin á økinum.
3. Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nátúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.
4. Byggistigið má ikki fara upp um 0,3
5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu, longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.
9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
j.nr. 22/07223-3, Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging av bústaðar- stovns- og vinnubygging í samsvari við omanfyri standandi, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við einari hædd omaná.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## 28/23 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 11/23 | 22/07317-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 28/23 | 22/07317-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt er at fara undir útstykking omanfyri Argjahamar, sí mál *Útstykking oman fyri Argjahamar. j.nr. 21/01777*. Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri økið kunnu útstykkingar bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
Útstykkingin omanfyri Argjahamar er skipað við støði í prosjekteraða vegnum í økinum.

Sambært uppskotinum til skipan av økinum, sí kortskjal *Skipan av øki_útstykkking omanfyri Argjahamar,* j.nr. 22/07317-8, verður rúm fyri uml. 190 bústøðum í sethúsum, raðhúsum og íbúðum. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum. Harumframt er eitt stórt øki lagt av til bústovn/sambýli og eitt øki lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Økið er býtt í 5 smærri øki, sí kortskjal *Økisbýti 20.01.23,* j.nr. 22/07317-7, og er ein yvirskipað lýsing av meginreglunum fyri ymsu økini niðanfyri:

**Øki 1:**
Økið verður lagt til sethúsagrundstykki. Grundstykkini eru 400 $m^2$ til støddar, og mest loyvda hædd og vídd verður sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri sethúsabygging.

**Øki 2:**
Økið verður lagt til bústovn/sambýli. Mest loyvda hædd og vídd verður sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri A3 øki.

**Øki 3:**
Økið verður lagt til íbúðir í tveimum hæddum, bygdar omaná miðstaðarvirksemi. Virksemið skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1, ið er virksemi, ið kann staðsetast í bústaðarøki. Tað kann t.d. vera handlar, skrivstovur, læknar, matstovur og aðrar tænastuvinnur. Inngongdin til íbúðirnar verður omanfyri bygningina og inngongdin til miðstaðarbygningina verður niðanfyri bygningina.

Niðanfyri bygningina er stórt felags p-pláss, ið er ætlað miðstaðarbygningini og dagstovninum á Argjahamri.

**Øki 4:**
Økið verður lagt til raðhús og/ella íbúðir. Bygningin verður í mesta lagi í 4 hæddum. Ymiskir møguleikar eru fyri innrætting av eindunum, t.d. kunnu tær býtast í tvey, soleiðis at tvær íbúðir vera í eindini, eindin kann vera nýtt sum raðhús við egnum grundøki, ella niðasta hædd kann nýast sum bilskýli við bústaði omaná.

**Øki 5:**
Økið verður lagt til raðhús. Hvørt grundstykki er uml. 200 $m^2$ og bygt í trimum hæddum við inngongd í miðhæddini (veghædd omanfyri bygningina).

Ynskið er at skapa eitt trygt umhvørvi, og tí er vegurin til øki 2-5, ið annars kann tykjast langligur, í støðum býttur sundur av vøkstri og felags parkeringsøkjum. Harafturat er vegurin atskildur frá bústøðunum við

meginregluni um, at tað eru parkeringsøki og grønur geiri ímillum vegin og bústaðirnar, og skapa hesi eina varda bústaðar-zonu, við gonguleið og bústøðum.

Felags fyri økini er, at tey øll hava felags fríøki, og umframt tey smb. almennu byggisamtyktini kravdu parkeringsplássini, so eru eisini øki løgd av til felags parkeringsøki.

Lendini verða boðin út, sí j.nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* og endaligu byggisamtyktarøkini verða nágreinað saman við mennarunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk, og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Útstykking oman fyri Argjahamar,* j.nr. 21/01777.
- *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* j.nr. 22/07223.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar, j.nr. 22/07317-8
Økisbýti 20.01.23, j.nr. 22/07317-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið omanfyri Argjahamar sambært meginreglunum nevndar omanfyri, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við eini hædd omaná.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 18:20</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Súsanna Olsen | |